

ÁRSRIT

# 2019

TJÓÐSAVNIÐ

FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM

NATURE AND CULTURE



*Vanlig skinfluga*

**TJÓÐSAVNIÐ** Ársrit 2019
Lagt til rættis: Savna
Snið og uppseting: Pætur Eyðunsson Jensen / Droym
Prent og liðuggerð: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

## INNIHALDSYVIRLIT

**5** Fororð
**6** Torradagar
**7** Darwin og klukkurnar
**8** Smákyktaveiða í miðbýnum í Havn
**10** Føroysk klæðir – gamalt verður nýtt?
**11** Serframsýning / Merkið 100 ár
**12** Savnsdagur
**13** Smátt – men stórt / Ferðaframsýning
**14** Savnsfagnaður 2019
**15** Myndirnar hjá Absalon á framsýning í Íslandi
**17** Søguliga Sanatoriið í Hoydølum
**27** Fornminni og bakkaverjur
**30** Fornfrøði í 2019 / Fornminnaskráseting kring landið
**33** Fornfrøðiligar rannsóknir
**36** Varðveitingararbeiðið í Kirkjubø 2019
**38** Summarið 2019 Hvalastøðin við Áir sýnd fram
**39** Verkætlanin at varðveita hvalastøðina við Áir helt fram
**40** Kennir tú blómurnar, sum vaksa her í Føroyum?
**43** Násturan í Koltri 2019
**44** Ringmerking og fuglakanningar í 2019
**47** Fokusstakkan í makromyndum
**48** Høvuðsarbeiðsøkið hjá Bygningadeildini er tann bygningaligi mentanararvurin
**49** Fornminnisnevndin
**50** Royndarumvæling av laðaðu múrunum á Skansanum
**51** Konservering av altartalvum
**52** Skúlatænastan á Tjóðsavninum
**53** Tit vunnu eina rannsóknarferð út í Tindhólm
**54** Forkunnig sølubúð
**56** Miðlan 2019 / Útgávur
**57** Tjóðsavnið í miðlunum 2019
**58** Norðurlendski ríkisantikvarfundurin 2019
**59** Norðurlendskur savnsstjórafundur
**60** ODM's formidlingsseminar 2019
**61** Altjóða ráðstevnur og fundir Tjóðsavnið luttók á 2019
**61** Skeið: MRT® – sálarlig treystisvenjing
**62** Á kunningarferð í Århus og Horsens november 2019
**63** Starvsfólkadagar oktober 2019
**64** Vitjan á søvnum í Danmark og Noregi 2019
**66** Vitjanartøl til framsýningarnar 2019
**67** Starvsfólk
**68** Vit ganga
**69** Summary in English



*"Umframt at Tjóðsavnið hevur verið sera virkið á sosialu miðlunum vóru starvsfólk yvir hálvthundrað ferðir í miðlunum sum viðmerkjarar, serfrøðingar og við greinum"*



## FORORÐ

Hetta ársrit lýsir í høvuðsheitum virksemi Tjóðsavnsins í 2019. Allir høvuðstættir eru lýstir í styttri ella longri frágreiðingum ella greinum. Endamálið við ritinum er at geva lesaranum eitt gott innlit í, hvat rørist á savninum uttan at fara í smálutir. Tí er neyðugt hjá okkum at velja út og raðfesta, hvat vit vilja leggja fram fyri lesaran. Ritið kundi verið munandi rúgvismiklari, um alt virksemið skuldi verið lýst, men vit meta ikki, at tað hevði tænt endamálinum við ritinum.

Árið 2019 var, eins og undanfarin ár, sera hendingaríkt, og hevur virksemið á ymisku deildunum og framsýningunum sjáldan verið størri. Á Tjóðsavninum eru tríggjar deildir á náttúruøkinum: Djór í sjónum, Djór á landi og Plantudeildin.

Á mentanarøkinum eru somuleiðis tríggjar deildir: Fornfrøðideildin, Fólkalívsdeildin og Bygningadeildin. Afturat hesum deildum hava vit ein bólk av starvsfólki, sum miðlar virksemi savnsins við undirvísing, útgávum, framsýningum og tiltøkum.

Allar deildir hava, hvør á sínum øki, sum høvuðsuppgávu at savna inn, skráseta, granska og miðla arbeiði sítt, men eisini at taka sær av bundnum myndugleikauppgávum.

Tjóðsavnið arbeiðir eisini við tveimum serstøkum verkætlanum, sum hava fingið beinleiðis játtan á fíggjarlógini í 2019. Tær eru múrurin og fornminnini í Kirkjubø og hvalastøðin við Áir. Verkætlanin í Kirkjubø heldur fram í 2020, og verkætlanin við Áir nøkur ár afturat.

Allar fakdeildirnar vóru sera virknar 2019. Men sum vera man var mest sjónliga virksemið framsýningarnar og miðlingin. Savnið hevði í 2019 tríggjar serframsýningar: "Merkið 100 ár", "Føroysk klæðir – gamalt verður nýtt" og stóru myndaframsýningina "Smátt men stórt". Myndaframsýningin "Smátt men stórt" var ein ferðaframsýning, sum varð sýnd kring allar oyggjarnar.

Tjóðsavnið var eisini nógv alment frammi í 2019. Umframt at hava verið sera virkið á sosialu miðlunum, vóru starvsfólk yvir hálvthundrað ferðir í miðlunum sum viðmerkjarar, sum serfrøðingar og við greinum.

Umframt fakliga, miðla- og framsýningarvirksemið skipaði Tjóðsavnið eisini fyri tveimum stórum tiltøkum. Annað var "Smákyktaveiðan" í sambandi við mentanarnáttina í Havn. Hitt var árligi og afturvendandi Savnsfagnaðurin, sum varð hildin í heystfrítíðini í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Hoyvík.

Øll hesi átøkini og alt virksemið hevur heilt víst havt við sær, at vitjanartalið á Tjóðsavninum ongantíð hevur verið størri enn í 2019 – og tað áhugaverda er, at vøksturin av vitjandi føroyingum er eins stórur og vøksturin av ferðafólki.

Les meira um virksemi okkara í hesum riti – ger so væl!

**Herleif Hammer**
*stjóri*



Høllin í Spinnarínum var karmurin um framsýningarnar




Gomul skelti hjá Sparikassanum

# TORRADAGAR

## Torradagarnar í Klaksvík 18.-23. februar 2019 varð skipað fyri ymiskum mentanarligum tiltøkum við tilknýti til lokalu søguna eins og samtíðina

**24. september 2019** vóru 100 ár liðin, síðan Norðoya Sparikassi varð settur á stovn, og varð hetta hátíðarhildið á ymsan hátt alt árið.

Á Torradøgunum var Spinnaríið karmur um ymisk tiltøk, har Sparikassin umframt eina framsýning av brúkslutum og søguligum tilfari hjá stovninum eisini hevði fingið Eyðálv Gulklett at gera eina forvitnisliga framsýning við seðlum og myntum heilt aftur til dagar Magnus Heinasonar.

Av serligum lokalum áhuga vóru helst myntirnir, ið J.F.Kjølbro læt sláa í 1930. Afturat myntsettum var eisini høvi at síggja stemplini, ið vóru brúkt, og sum Tjóðsavnið hevði lænt Sparikassanum til hesa framsýning.



Myntstemplini, ið lænt vóru frá Tjóðsavninum



Jón Aldará greiðir frá leyuklukku






Ymisku bókaútgávurnar eru at fáa í savnsbúðini

# Darwin og klukkurnar

## Í sambandi við eina bókaútgávu hjá Bókadeild Føroya Lærarafelag samstarvaðu BFL og Tjóðsavnið um eitt familjutiltak 16. mars á Tjóðsavninum í Brekkutúni 6 í Hoyvík

**Bøkurnar, ið talan var um**, vóru *Um upprunan til sløgini*, ið er ein endursøga av *Origin of the Species* eftir Charles Darwin, og *Klukkusavnarahandbókin*, ið er ein handbók til røðina um dreingin Darkus. Higartil eru komnar tvær av trimum bókum út: *Klukkudrongurin* og *Klukkudrotningin* og tann triðja, *Klukkubardagin*, kemur í heyst.



Klukkur vóru eisini til matna

Magnus Gaard, lívfrøðingur á Tjóðsavninum, hugleiddi um Charles Darwin og um *Upprunan til sløgini*. Tórarinn á Rípuni, savnslærari, hevði eina lítla rundvísing um dýr í Føroyum, sum eru broytt, tillagað ella útdeyð. Silja Aldudóttir, ritstjóri hjá BFL, greiddi frá klukku-skaldsøgunum og Klukkusavnarahandbókini. Jón Aldará, lívfrøðingur á Tjóðsavninum, greiddi frá klukkum í Føroyum. At enda sluppu børnini at leita eftir klukkum. 15 ymsar klukkur vóru krógvaðar ymsastaðni á savninum, og tær skuldu savnast saman í krukkur.

Í viku 12, 18. – 22. mars 2019, varð eisini skipað fyri skúlavitjanum, har skráin var tann sama, tó stytt eitt sindur. Kristianna Poulsen lærari frá BFL greiddi frá Darwin og frá *Upprunanum til sløgini*.

Rundvísingin um dýr í Føroyum var tann sama sum á familjutiltakinum. Silja Aldudóttir greiddi frá klukkum í Føroyum og klukkubókarøðini. Skúlavitjanirnar endaðu eisini við klukkuveiðu.



Næmingur á klukkuveiðu

# Smákykta-veiða í miðbýnum í Havn

**Í sambandi við** at ferðaframsýningin “Smátt men stórt” læt upp í Finsen mentanarnáttina 7. juni, skipaði Tjóðsavnið saman við Visit Tórshavn fyri tiltaki fyri børn og aðrar barnsligar sálir. Talan var um eina “smákyktaveiðu” í miðbýnum í Havn. Framleiddar vóru nakrar eyka myndir av sama slagi, sum vórðu gjørdar til framsýningina “Smátt men stórt”. Myndirnar vóru settar upp í skýmligum skotum og krókum í býnum. Tey, ið høvdu hug at taka lut, kundu heinta eitt skattakort við kunningardiskin hjá Visit Tórshavn ella í Finsen. Síðani var at finna øll smákyktini, svara spurnarblaðnum og so lata tað innaftur á Visit Tórshavn ella í Finsen. Tey, ið vóru við, kundu vinna ein blómutúr við plantufrøðingi Tjóðsavnsins.



*Í skotinum við Fotobúðina hekk ein køstafluga*



*Aftan fyri vaskaríið hekk ein skinfluga*



*Ein eiturkoppur í einum skoti við gongugøtuna*



Nøgvir ymiskir búnar vóru at síggja

Hosur og hosubond

# FØROYSK KLÆÐIR
## – gamalt verður nýtt?

**Um ólavsøkuna** skipaði Tjóðsavnið fyri støkkframsýning í Brekkutúni saman við Marjun Heimá Sp/f. Sýnd vórðu fram nútímans føroysk klæðir – lið um lið við myndum og pløggum úr goymslu Tjóðsavnsins. Støkkframsýningin vísti á stórt fjølbroytni í føroysku klæðunum, bæði nú og fyrr. Eisini sást, at føroysku klæðini eru ein livandi mentanararvur, har rák og tíð ávirka litir og snið av klæðum.

Vit ynsktu eitt føroysk orð fyri enska orðið "pop-up exhibition", fyrispurningur var settur Málráðnum, um til bar at brúka støkkframsýning – og tað ber til.

Marjun Heimá Sp/f skal hava stóra tøkk fyri avbera gott samstarv.



Nýtt og gamalt

















Nøgvir forvitnisligir lutir við Merkinum á vóru at síggja. M.a. tundurproppur, putlispæl, kaffikoppur, og Merkið, sum Arni Vatnhamar hevði við sær á toppin á Mount Everest í 2014

# Merkið 100 ár

Við heitinum "Reytt sum blóð og fannhvítt og blátt sum havsins bylgja", læt Tjóðsavnið serframsýning upp 12. apríl, og varð hon standandi til aftaná ólavsøku

**Nógv er skrivað** um søguna hjá føroyska flagginum, Merkinum, bæði í sambandi við uppruna, tjóðskaparrørslu, góðkenning og viðurkenning annars. Ynski okkara var at hátíðarhalda 100 ára dag Merkisins við einari serframsýning, har dentur varð lagdur á aðrar søgur enn tær kendastu.

Tjóðsavnið vildi við serframsýningini varpa ljós á, hvussu føroyingar hava tikið flaggið til sín, og hvussu fólk og land okkara hava brúkt Merkið og flagglitirnar gjøgnum hesi 100 árni síðan 1919, tá Merkið varð teknað.

Hvørjar lutir velja vit at prýða við føroyska flagginum? Til hvørji høvi nýta vit Merkið og litir tess?

Eisini ynskti Tjóðsavnið at varpa ljós á spurningin um, hvar markið gongur, tá Merkið verður nýtt í ymiskum høpi, og hvat løgtingslógin um nýtslu av flagginum sigur.

Serframsýning gav høvi til at sýna fram lutir úr goymslu Tjóðsavnsins, ið vanliga ikki verða sýndir fram, tí teir eru sera viðkvæmir fyri ljósi. Í samráð við konservatorin á Tjóðsavninum blivu nøkur fløgg vald út og fingu loyvi at prýða serframsýningina, millum teirra kann nevnast Veðraflaggið og Tjaldursflaggið.

Til serframsýningina fekk Tjóðsavnið lutir til láns, millum teirra var víðagitna flaggtroyggjan hjá Kristinu Háfoss og føroyska flaggið, ið Arni Vatnhamar hevði við sær upp á Mount Everest. Eisini sást fyrsta bilnummarplátan við føroyska flagginum, ið Akstovan lænti Tjóðsavninum.

"Merkið 100 ár", var ætlað øllum føroyingum. Ynskið um, at fleiri aldursbólkar kundu uppliva framsýningina saman, varð tikið við í tilrættisleggingini av serframsýningini um Merkið. Tí bleiv dentur lagdur á at seta saman eina framsýning, ið ikki var fylt við teksti, men heldur fylt við lutum, ljóði og myndum. Hesin leistur vísti seg at eydnast sera væl, og serframsýningin um Merkið bleiv væl móttikin av okkara vitjandi, bæði úr Føroyum og útlondum.

Tjóðsavnið takkar øllum, sum hava lænt okkum lutir til serframsýningina "Merkið 100 ár", og hjálpt til á annan hátt.




*Tíðin er helst farin frá at prýða plastposar við Merkisins litum*



*Í Reinsarínum greiðir Margretha Nónklett, leiðari á Tórshavnar Býarsavni, frá virksemi savnsins*

# SAVNSDAGUR

## Tjóðsavnið og Mentamálaráðið bjóðaðu til savnsdag á Hotel Hafnia fríggjadagin 16. august 2019. Gott 50 fólk úr 20 søvnum boðaðu frá luttøku

*Løgtingsstjórin Johnhard Klettheyggj greiðir frá arbeiðinum og mannagongdum í Løgtinginum*



**Dagurin byrjaði við** morgunmála á Hotel Hafnia. Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum, hevði eina framløgu um umsitingina av stuðli til søvnini. Jógvan Bærentsen, hagfrøðingur á Hagstovuni, helt eina framløgu um, hvussu hagtøl verða savnað, og hvussu hagtølini verða brúkt. Jógvan vísti á møguleikarnar við nýggju heimasíðuni hjá Hagstovuni. Avtalað var at arbeiða víðari við at fáa hagtøl fyri øll søvnini. Armgarð Weihe frá Mentamálaráðnum hevði eina framløgu um, hvussu leikluturin hjá søvnunum er mentur upp gjøgnum tíðina.



*Bólkaarbeiði inni í skansahúsinum*

Eftir framløgurnar var verkstovuarbeiði á skránni. Luttakararnir vórðu býttir í fýra tilvildarligar bólkar. Spurningarnir til bólkarnar vóru tríggir. Fyrsti snúði seg um, hvønn leiklut luttakararnir mettu, at teirra savn hevði. Næsti spurningur var, hvat kundi verða gjørt fyri at menna søvnini, og í triðja spurningi var spurt um, hvørji ynski vóru til eina nýggja savnslóg.

Í sambandi við verkstovuarbeiðið varð vitjað á ymiskum søguligum støðum í Havn. Har fingu luttakararnir eina stutta frágreiðing um staðið, og síðani varð arbeitt við spurningunum. Vitjað varð á Skansanum, í Løgtinginum, í Stokkastovuni í Tinganesi og á Reinsarínum.

Niðurstøðurnar, bólkarnir komu til, vóru í flestu førum sera eins. Til fyrsta spurning varð sagt, at umframt at savna inn og skráseta var uppgávan hjá lokalu søvnunum at siga frá tí serligu søguni, sum eyðkennir akkurát tað einstaka savnið, t.d. í Hvalba er tað kolasøgan, á Tvøroyri er tað tann eldra sjóvinnusøgan, á Nesi er tað nýggjari kirkjusøga o.s.fr.

Til annan spurning varð svarað við ein munn, at vantandi fíggjarlig orka var ein forðing fyri menning. Ein onnur avbjóðing var at fáa yngri fólk at taka við og føra søvnini víðari. Flestu av bólkunum løgdu dent á, at søvnunum vantaði fakliga vegleiðing. Hetta kundi verið gjørt við at sett fakfólk kring landið ella at sett eitt ella tvey fólk í starv á Tjóðsavninum til at taka sær av menningini av bygdasøvnunum burturav.

Til triðja spurningin um ynski til nýggja savnslóg var semja um, at krøv skuldu setast til fakligheit og meira professionalisering, tó uttan at verandi søvn mistu "vunnin rættindi". Her var hugsað um verandi rakstrarjáttanir frá Løgtinginum.

Dagurin endaði á Hotel Hafnia, har bólkarnir løgdu fram, og tikið var samanum. Stór semja var um, at tørvur var á slíkum tiltøkum sum savnsdøgum, og ynski var um at hittast aftur, tá arbeitt verður við einari nýggjari savnslóg.





*Úr Skálanum í Klaksvík*

# SMÁTT – MEN STÓRT FERÐAFRAMSÝNING



*Sørvágs skúli var karmur um framsýningina í Vágum*



*Mynd úr forhøllini hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri*

Tjóðsavnið var á ferð kring landið við heilt serligari myndaframsýning. Myndirnar vóru av vanligum smákyktum, sum dagliga eru kring okkum, men sum vit oftani ikki geva okkum far um. Kyktini eru smá, tí vita tey flestu av okkum ikki, hvussu tey í veruleikanum síggja út, og hvussu fantastiska vøkur fleiri av teimum eru í veruleikanum – ella kanska fantastiska óhugnalig.

Við serligari fotoútgerð, sum Tjóðsavnið hevur ognað sær, tók Jan Sørensen savnsvørður hágóðskumyndir av smákyktunum. Hvussu hetta varð gjørt, er greitt frá aðrastaðni í hesum ársriti. Myndirnar vóru síðani gjørdar risastórar. Nakrar vóru 1,5 m í hædd og 2,5 m í breidd. Støddin á myndunum gjørdi, at tú veruliga kundi uppliva djórini á ein heilt serligan hátt, tí allar detaljur vóru avdúkaðar.




Tilsamans vóru 17 myndir av 17 ymiskum djórum. Í sambandi við framsýningina var eisini ein faldari gjørdur, sum hevði stuttar frágreiðingar um ymisku djórini, t.d. vóru upplýsingar um støðd, hvar tey "búðu", og hvat tey ótu. Framsýningin læt upp í Krambúðini í Vestmanna 24. mai. Síðani ferðaðist framsýningin kring landið, til hon móti heysti varð sýnd fram í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Hoyvík. Framsýningin var ókeypis og sera væl vitjað. 1654 fólk høvdu skrivað seg í gestabókina á teimum 7 støðunum, framsýningin vitjaði. Tá eru tølini frá framsýningini í Brekkutúni ikki tald við.



Huldugentan Heiða sigur frá huldusøgum

# SAVNS-FAGNAÐUR 2019



Stuttligt var at síggja, hvussu børnini dugdu at brúka hesa "gomlu" telefonina

## Yvirskipaða evnið á savnsfagnaðinum 2019 var samskifti í breiðasta týdningi




*Jarðfeingi hevði gjørt spennandi framsýning um uppruna jarðarinnar*

Sera nógv fólk vitjaðu savnið hesa vikuna. Omanfyri 2200 fólk vitjaðu savnið hesar dagarnar. Fyri at tað ikki skuldi tykjast yvirfylt vóru framsýningar og tiltøk spjadd út um alt framsýningarøkið. Niðriundir vóru fleiri ymsar støðir, har ymiskt forvitnisligt var á skránni. Millum annað var ein tatoveringsstova, ið varð sera væl umtókt; málingin varð uppi fleiri ferðir. Eisini vóru fleiri smáar framsýningar og myndatalvur. Millum annað um lanternur, fløgg, morsing, viðingar í træbulum og telefonir. Borð og stólar stóðu ymsastaðni, so børn og vaksin kundu seta seg niður at tekna og spæla ymiskt.

Afturvendandi básurin við mikroskopum, har til ber at síggja smákykt, var eisini millum væl umtóktu tiltøkini.

Í erva var eisini ymiskt á skránni. Jarðfeingi hevði ein bás, har til bar at royna virtual reality. Myndaboks hevði ein bás, har øll kundu fáa myndir tiknar. Inni í skúlastovuni kundu børn royna ymiskt, millum annað skriva við skrivimaskinum og fjøðurpennum. Ein gomul telefon var eisini sett upp til børnini at royna; og tað vóru tey fáu, ið dugdu at brúka hana.

Huldugentan Heiða hevði huldusøgu og sangløtu hvønn morgun klokkan 10:15 fyri yngru børnunum, og hvønn seinnapart kl. 14:00 høvdu strandaðu sjórænararnir, Svartskegg og Jack Tyler, eina spennandi vitanarveiðu.

Í skúlastovuni vóru granskarasøgur dagliga klokkan 13:30. Vit hoyrdu millum annað um, hvussu plantur samskifta og um eitt gosfjall í Sørvágsfirði. Børnini kundu eisini fáa eitt uppgávuhefti, har svarini vóru at finna runt á savninum.

2259 børn og vaksin vitjaðu savnsfagnaðin í 2019. Umframt góðu afturmeldingarnar gevur høga vitjanartalið eina góða ábending um, at tiltakið eydnaðist stak væl og nøktar ein tørv hjá barnafamiljum í heystfrítíðini.



*Putlispæl við nýggjum og gomlum telefonum*





# Myndirnar hjá Absalon á framsýning í Íslandi




## Tjóðsavnið hevur nógvar myndir eftir Absalon Joensen (1872-1950), ættaður úr Gerðum í Klaksvík



*Absalon Joensen (SNR. 3350F7114)*





Absalon var fyrst handverkari, seinni prestur bæði í Føroyum og í Danmark. Hann ferðaðist víða og skrivaði m.a. *Min Jorsalsferd – Beskrivelse af en Rejse fra Færøerne til Palæstina i Aaret 1925* (København 1926).

Hann virkaði eisini sum sjómanstrúboðari millum føroyingar í Íslandi.

Hansara mongu fólkalívsmyndir eru sannir dýrgripir. Absalon var í fleiri umførum í Íslandi í seinnu helvt av 1920-árunum og tók myndir av føroyskum útróðrar- og fiskimonnum.

Tað fréttist í Íslandi um myndirnar hjá Absalon Joensen. Sumarliði R. Ísleifsson, lektari á Sagnfræði- og heimspekideild á Háskóla Íslands, hevur samstarvað við søvn á Eysturlandinum um framsýningina í *Randulffssjóhús* á Eskifirði. Framsýningin stóð uppi frá 31. mai til 31. august 2019

Ólavur H. Øster, savnsteknikari á Tjóðsavninum, leitaði fram myndir og hevði sambandið við Sumarliða Ísleifsson.

*Nærmynd av Gamla Húsi og av Hoydalsbrekkuni (Tjóðsavnið, snr. 9018F065)*

# SØGULIGA SANATORIIÐ Í HOYDØLUM

Í seinnu helvt av 19. øld koma tey fyrstu tølini, sum staðfesta tuberklasjúkuna sum deyðsorsøk. Tølini vóru høg. Í 1898 fekk embætislæknin heimild at sóttreinsa bústaðir, innbúgv og seingjarklæði hjá fólki, sum vóru deyð av smittandi lungnatuberklum. Ein tuberklalóg í 1905 gav heimild til at leggja fólk inn, sum bóru grova smittu, og í 1905 varð við fyriskipan sett í verk lóg um statsstudning til sjúkrahús fyri tuberklasjúku. Í 1912 kom ein reglugerð fyri, hvussu sóttreinsan skuldi fara fram

**Tekstur: Erland V. Joensen, savnsvørður**

Málið at byggja tuberklasjúkrahús og sanatorium byrjaði helst í 1904. Onkur helt, at byggjast skuldi á Sandi ella nærhendis Miðvági, t.e. við Leitisvatn/Sørvágsvatn, men ongin tók støðu, fyrr enn amtmaðurin setti seg í samband við danska tuberklafelagið, 'Nationalforeningen for Tuberkulosens Bekæmpelse', sum vísti á Hoydalar. Har varð 'Færøernes Amtkommunes Tuberkulosesygehus' bygt í 1908. Tá var títtleikin av tuberklum høgur.

## SANATORIIÐ HEVÐI TVÆR SJÁLVSTØÐUGAR DEILDIR:

**FÓLKASANATORIUDEILD**
– til sjúklingar í viðgerð, sum nýliga høvdu fingið lungnatuberklar, 16 sengur, 8 til kvinnur og 8 sengur til menn.



*Sanatoriið – Gamla Hús, og rennistrongur fram við Hoydalsá (Tjóðsavnið SNR. 043F94)*

**TUBERKLASJÚKRAHÚSDEILD**
– til sjúklingar í viðgerð, sum høvdu lungnatuberklar, 16 sengur, 8 til kvinnur og 8 sengur til menn.

Amtið fekk nýtslurættin til lendið í Niðaru Hoydølum frá 'Thorshavns Kommunalbestyrelse' og 'Besidderne af Højvig' í 1907. Sambært sáttmála millum Amtið og Firmaet Ludvigsen & Hermann skuldi byggingin av tuberklasjúkrahúsinum byrja í seinasta lagi tann 1. juli 1907. Onkuntíð verður sagt, at Sanatoriið kom sum byggisett. Skip lá útfyri Boðanes, og síðani varð tilfarið ført niðan í dalin við rennistreingjum. Skjøl vísa í øllum førum, at arbeiðið at føra 18.000 múrsteinar *"fra Buanes til Sygehuset"* varð boðið út.



*Umsjónarmaðurin Dánial Hoydal (Tjóðsavnið, SNR. 8745F093b)*

# SØGULIGA SANATORIIÐ Í HOYDØLUM

Tað hevur verið hildið, at Sanatoriið var eitt norskt bygt skíðhotell. Tilboð kom frá verksmiðjuni Strømmen Trævarefabrik nærhendis Christiania (Oslo), men varð vrakað. Tað vóru donsku fyritøkurnar, A/S Oscar Køhler og A/S Ludvigsen & Hermann, sum fingu arbeiðið. Sum orðað í sáttmálanum fór arbeiðið helst í gongd 1. juli 1907, og fyrstu sjúklingarnir komu í juni 1908. Men tá var Sanatoriið enn ikki liðugt. Heystið 1908 varð arbeitt við at innrætta bygningin, og ár gingu, til alt var liðugt. Byggingin varð fíggjað av Amtinum, við stuðli úr danska ríkiskassanum og av danska felagnum, 'Nationalforeningen til Tuberkulosens Bekæmpelse'.

Leingi var bara eitt sjúkrahús í Føroyum, Gamla Hospital í Havn, bygt í 1829. Tað var ikki tíðarhóskandi. Tey tvey smáu, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús, vórðu bygd ávikavist í 1898 og 1904. Dronning Alexandrines Hospital, seinni Landssjúkrahúsið, stóð liðugt at taka í brúk í februar 1924.



*Sanatoriið – Gamla Hús. Her síggjast fýra liggihallir – tvær fastar í Gamla Húsi, ein í hvørjum enda, ein er omanfyri, og ein er vestanfyri. Tað verður sagt, at gøtan varð gjørd til Sanatoriið. Teir báðir liggihallirnir fastir í Gamla Húsi, hava verið eins. Hinir báðir, tann omanfyri og tann vestanfyri Gamla Hús, hava verið eins í skapi. (Tjóðsavnið, SNR. 3350F2060)*

Tá ið Sanatoriið varð tikið í nýtslu í 1908, var tað ein stórfingin bygningur. Feðgarnir Valdemar Ingemann (1840-1911) og Bernhard Ingemann (1869-1923), arkitektar í København, teknaðu Sanatoriið. Helst er endaliga uppskotið um høvuðsbygningin, *Gamla Hús*, frá mai 1906. Í tíðini 1901 og fram vórðu tilsamans 23 tuberklasjúkrahús og sanatorii bygd í Danmark. Arkitektarnir Ingemann samstarvaðu um at tekna flestu teirra, sum 'Nationalforeningen for Tuberkulosens Bekæmpelse' í høvuðsheitum hevði fíggjað. Bernhard Ingemann var bygningsumsjónarmaður hjá felagnum.

## GAMLA HÚS

Á tekningini av Sanatoriinum – Gamla Hús eru hvílihallir, millum sjúklingar og onnur nevndir *liggihallir*. Har lógu sjúklingar við tuberklum undir taki, men tó úti í frískari luft. Hesir liggihallir vóru upprunaliga ikki í tilboðnum, og vórðu bygdir uppí Gamla Hús, á skjøldrunum báðum, eystur- og vestureftir. Í brævi, 23. mars 1908, frá Sanatoriunevndini til stjóran Segelche á Strømmen Trævarefabrik, varð tilboðið um fýra liggihallir til umrøðu. Tveir vóru til Gamla Hús, og aðrir tveir skuldu standa í lendinum. Í øðrum brævi til amtmann Bærentsen frá Strømmen Trævarefabrik, 5. mai 1908, varð sagt, at *"Materialerne til Liggehallerne for Færøerne-Sanatorium afgår med S/S Prospero."* Rokning frá Strømmen Trævarefabrik varð send amtmanni Bærentsen. Sostatt kom eisini ein luteind av Sanatoriinum úr Noregi.

Tó at arkitektarnir vóru danskir, so hevur sjálvur høvuðsbygningurin, Gamla Hús, ikki danskt byggisnið, ella ber brá av danskari byggilist. Gamla Hús er úr timbri, sum heldur ikki er vanligt danskt byggitilfar. Stílsøgan í Gamla Húsi hevur okkurt skandinaviskt/norðurlendskt yvir sær, og ber helst brá av tjóðskaparromantikki. Gamla Hús umboðar andan í samtíðini. Gamla Hús er bygningurin, sum serliga myndar tað bygda økið. Gamla Hús hevjar seg tignarliga út yvir lendið. Gamla Hús hevði flagtekju. Tann niðasta hæddin var sanatorium. Menninir lógu í vesturendanum og kvinnurnar í eysturendanum. Sjúkrahúsið var á 1. hædd.



*Tekning av Sanatoriinum, København í mai 1906. Onnur uppskot eru á Tjóðskjalasavninum (Des. A. 45. Tuberkulosesygehus for Færøerne. V. & B. Ingemann, Architecter. Kbh. Maj 06.)*

Í 1920-árunum var Sanatoriið vorðið ov lítið. Í 1924 varð 'Føroya felag móti tuberklasjúku' sett á stovn. Endamálið við felagnum var eisini at fáa bygt eitt veruligt tuberklasjúkrahús. Í 1927 varð T.B. bygt sum deild við 20 seingjum við Landssjúkrahúsið. Árið eftir kom ein deild til 20 børn – 'Barakkirnar', við Landssjúkrahúsið. Í 1928 varð Tuberklastøðin sett á stovn. Føroyska tuberklafelagið fíggjaði lønina hjá sjúkrasystur, sum ferðaðist um landið at upplýsa um sjúkuna. Danski staturin góðkendi Tuberklastøðina, og yvirlækni varð settur í Hoydølum, sum eisini hevði støðina undir sær. Somuleiðis varð ein serkøn sjúkrasystur sett í starv. Tíðin var komin at byggja út í Hoydølum.



*Doktarahúsini vinstrumegin á myndini (Tjóðsavnið, SNR. 8907F011)*

## NÝGGJA HÚS

Tá ið hesi hús stóðu uppi og klár at taka í nýtslu, helst í 1932, gjørdist pláss fyri 20 seingjum afturat teimum 32, seinni 34 í Gamla Húsi. Ætlanin at byggja Nýggja Hús er helst byrjað í 1930. Nýggja Hús og ein liggihallur stóðu í gerð 1931-32, vórðu tikin í nýtslu í 1932. Sjúkrasystirin, sum ferðaðist kring landið, hevði gjørt vart við, at tuberklarnir gingu. Støðan tyktist hættislig, og brúk var fyri øllum 20 seingjum í nýggja bygninginum.

Arbeiðstakarin Steingrím Winther í Havn stóð fyri verkætlanini. Har fór fram spreinging, steinseting, stoypi-, rør- og timburarbeiði. Tekningina átti hann sjálvur. Tann 20. oktober 1931 var reisigildi. Sentralhiti varð lagdur inn í Nýggja Hús.

## DOKTARAHÚSINI

Nýsetti yvirlæknin í tuberklasjúkum, Erik Lynge, hevði starvsstað á Sanatoriinum árini 1931-36, og vildi búgva í Hoydølum. Tí bygdi hann sær hús. Seinni vórðu tey yvirtikin av Løgtinginum. Doktarahúsini standa omanfyri Nýggja Hús, við Hvítanesvegin, og eru eini valahús, stór og rúmlig við kvisti og karnappi. Tey stóðu helst í gerð 1931-32.



*Vinstrumegin Nýggja Hús við liggihall (Tjóðsavnið, SNR. 8932F241)*



*Uml. 1941-42. Sjúklingar og starvsfólk á trappuni við Nýggja Hús (Tjóðsavnið, SNR. 3350F2069)*

## SANATORIIÐ – EIN BYGNINGAEIND

Gamla Hús, Nýggja Hús og Doktarahúsini vóru tey størstu og mest ásýniligu byggiverkini í Hoydølum. At síggja til fevndi upprunaliga verkætlanin hjá arkitektunum Ingemann um: 1) Hovedbygning, 2) Maskinbygning og 3) Accumulatorbygning.

Síðani vórðu fýra liggihallir settar upp, og tá ið Nýggja Hús varð bygt, kom ein liggihallur afturat. Tá ið Sanatoriið varð tikið í nýtslu, komu onnur úthús so líðandi. Dánial Hoydal varð settur sum umsjónarmaður, og nógv var at fara um. Edw. Mitens hevur hesa lýsing av tí dagliga arbeiðinum á Sanatoriinum: *"Tey høvdu kúgv – eina tíð vóru 3 kýr – hønsagarð og dunnuhyl við dunnum og gásum. Hestur og vognur vóru. Hoydal hevði nógv at takast við, skera torv, hoyggja, væla um húsini, koyra til Havnar eftir vørum og tíverri ofta við líkkistum. Stík, vegir og gøtur skuldi haldast viðlíka o.s.fr."* Sanatoriið hevði neyt, hønur, dunnur og gæs. Tí vóru fleiri úthús.

# SØGULIGA SANATORIIÐ Í HOYDØLUM



*Sanatoriið, sæð úr erva. Fremst er vatnbrunnurin. Vatn kom úr Langadali. (Tjóðsavnið, SNR. 3350F2062)*

## GASSHÚSIÐ

Tá ið Sanatoriið varð bygt í 1908 var onki elektrisitet. Tí var eitt gassverk bygt til Gamla Hús. Tá ið el varð lagt til Sanatoriið, varð *Gasshúsið* niðurlagt í 1927. Í Løgtingstíðindum í 1926 stendur hetta um standin á Gasshúsinum: "…i en meget forfalden Tilstand, nærmest kassabelt…". Víðari verður sagt: "Dernæst fremkom man med Tanken om at afskære Taarnet i Højde med Tagryggen paa selve Bygningen, til Dels begrundet ved at man maa antage, at Taarnet foraarsager den Raadenskab, der er i Tagværket paa selve Bygningen."

Tá ið Sanatoriið fekk elektrisitet í 1927, varð tornið á Gasshúsinum niðurtikið.

## STUDENTASKÚLI Í HOYDØLUM

Í 1962 flutti 'Studentaskúli Føroya Løgtings', áður 'Studentaskúli og Preliminerskeið Føroya Løgtings', seinni Føroya Studentaskúli og HF-skeið', úr húsinum hjá Vandbygningsvæsenet, *VBV*, við Skansavegin í Havn, niðan í Hoydalar. Tá ið útbyggingin av Landssjúkrahúsinum byrjaði í 1961, vórðu bygdar tuberklastøð, tuberkladeild og røktardeild. Byggingin á Landssjúkrahúsinum var liðug í 1962, og pr. 1. februar sama ár vórðu sjúklingarnir fluttir úr Hoydølum og út á Landssjúkrahúsið. Tá læt Sanatoriið í Hoydølum aftur.

Skúlabyggingin í Hoydølum byrjaði í 1961. Í Gamla Húsi vórðu fyri fyrst innrættaðar 10 skúlastovur, serstovur, lærarastova og skrivstova. Nýggja Hús varð innrættað til kostdeild. Í 1964 vórðu tær fyrstu skúlastovurnar tiknar í brúk í skúlanum. Tann nýggi skúlin hevði aula, fimleikahøll, serstovur v.m., og varð tikin í nýtslu skúlaárið 1965-66. Arkitekturin Olaf Mortensen teknaði studentaskúlan.

Byggingin av Studentaskúlanum hevði við sær, at 1. tann eystari liggihallurin, 2. Dunnuhúsið og Dunnuhylurin, 8. Líkhús, 9. Høsnarhús, 10. Hoyggjhús, 11. Hoyggjhús og 12. Hjallur máttu dvína, og varð alt hetta tikið burtur til veg og parkeringspláss.



*Gasshúsið við torni v.m. Gamla Hús. (Tjóðsavnið, SNR. 3350F2063)*



*Gasshúsið við ongum torni. (Tjóðsavnið, SNR. 4825F080)*



## SKALDSKAPUR UM SANATORIIÐ

Rithøvundurin og politikarin, Karsten Hoydal, (1912-90) vaks upp í Hoydølum. Pápin var umsjónarmaðurin á Sanatoriinum, Dánial Hoydal. Í savninum 'Vatnið og ljósið' (1960) er minnisyrkingin um pápan, 'Ganga nú á meg minnini'. Her er fyrsta ørindið um Hoydalar, *Dalin Fagra*, og starvið hjá pápanum at koyra sjúk og deyð til og frá:

*Ganga nú á meg minnini,*
*mær goymdu oyru og eygu:*
*Dalurin fagri, mín barnaheimur,*
*millum brattar og brúnar heygar -*
*faðir mín flutti tey sjúku til,*
*burtur frísk og tey deyðu.*

Í aðrari yrking, 'Songur til Studentaskúlan' (1966), sæst eisini ótti og deyði, og somuleiðis er ein stuttsøga, 'Lítla, gula húsið' (1962). Søgan er ein lýsing hjá smádrongi á Sanatoriinum, serliga av Líkhúsinum, t.e. tað lítla, gula húsið. Sonur Karsten Hoydal, Gunnar Hoydal, f. 1941, hevur eisini skrivað um Hoydalar og Sanatoriið. Skaldsøgan 'Dalurin Fagri' (1999) er ein tilvísing til yrkingina hjá pápanum omanfyri, 'Ganga nú á meg minnini'.

## MYRKA SØGAN ÚTI UM LANDIÐ OG Í HOYDØLUM

**– leikluturin hjá Vilhelm Magnussen**

Vilhelm Magnussen (1904-89), serlækni í tuberklasjúku, varð settur í starv sum yvirlækni í 1936, og røkti starvið fram til 1974. Frammanundan hevði hann arbeitt á Øresunds Tuberkulosehospital. Vilhelm Magnussen legði dent á, at lógin um tvungna tuberklakanning av fiskimonnum varð sett í gildi í 1939. Sagt verður, at hann kundi kanna 30 fiskimenn um tíman.

Hann fór alt fyri eitt at ferðast kring oyggjarnar at leita eftir sjúkum fólki. Við honum var ein sjúkrasystir. Hon pirkaði – skavaði í húðina, og koyrdi evnið tuberkulin í fyri at fáa staðfest, hvør hevði smittuna. Sjúkrasystir, sum hevði hetta starv, varð nevnd *Pirkan*. Magnussen hevur sagt hetta um tuberklarnar: "*Hetta er ein lúrandi og órein sjúka. Tá doyði nógv fólk árliga av tuberklum. Okkurt árið fór talið uppum 30. Hetta var eitt óhugnaliga stórt tal í einum lítlum samfelag, og tá var fólkatalið nógv minni enn tað er í dag.*" Summar bygdir vóru hart raktar, Sørvágur, Mykines, Viðareiði og Skúvoy.

Liggihallirnir vóru at hvíla seg í, upp til fleiri ferðir um dagin, og fyri at fáa fríska luft. Sjúklingar skuldu eisini spáka og soleiðis fáa bæði fríska luft, likamsvenjing og rørslu. Góður kostur var eisini partur av viðgerðini at fáa heilsubót. Harnæst varð hildið, at nálatrø skuldu vera lekjandi móti tuberklasjúkuni.

*Sanatoriið. Myndin er tikin eftir 1953 og fyri 1961 (Tjóðsavnið, SNR. 6898F015)*



# SØGULIGA SANATORIIÐ Í HOYDØLUM

*Sanatoriið 1949. Á myndini síggjast allir bygningar, og næstan øll úthús. Hesumegin garðin er sonevnda Hoydalstrøðin. Jóhan hjá Símuni Joensen – Símun uttan fyri Garðar – legði trøðna inn. Símun var av Glyvrum, og niðursetumaður í Hoyvík í 1835. Vatnbrunnurin er ikki í brúki longur. Er tí tyrvdur, men farvegur sæst tó til hansara. Liggihallurin, nærhendis verandi liggihall við Nýggja Hús – grundin er til. Vatnbrunnur og omanfyri nevndi liggihallur síggjast ikki á myndini. Hesir síggjast á ovastu mynd á síðu 20. (Tjóðsavnið, SNR. 9018F084)*




1. Gamla Hús og tveir liggihallir. Gamla Hús stendur enn. Tann vestari liggihallurin er til. Gamla Hús hevur ikki flagtekju longur, og tey flestu vindeygu eru skift út, somuleiðis klædningurin.
2. Dunnuhúsið er ikki til.
3. Nýggja Hús og ein liggihallur. Nýggja Hús brann í 2007 og nýtt hús varð sett omaná grundina. Liggihallurin er tó til enn.
4. Doktarahúsini standa, men hava ikki flagtekju longur.
5. Hjallurin er ikki til.
6. Liggihallurin stendur ikki uppi. Grundin er til.
7. Gasshúsið stendur, men er broytt.
8. Líkhús er ikki til.
9. Høsnarhús er ikki til.
10. Fjós er ikki til.
11. Hoyggjhús er ikki til.
12. Hjallur er ikki til.

# SØGULIGA SANATORIIÐ Í HOYDØLUM



*Studentaskúlin uml. 1962-64 (Tjóðsavnið, SNR. 9047-01-22-02)*

## MENTANARLANDSLAG OG MENTANARUMHVØRVI

Í 1913 byrjaði træplantingin í Hoydølum. 'Det danske Hedeselskab' stílaði fyri eftir áheitan frá yvirlæknanum á Sanatoriinum. Hvørt tað var av læknafrøðiligum ávum, at læknin vildi hava trævøkstur nærhendis Sanatoriið, ella tað var av fagurfrøðiligum ávum, so var trævøksturin tíðliga ein partur av umhvørvinum. Víst verður aftur til skaldskapin hjá Karsteni og Gunnari Hoydal, sum báðir hava Dalin Fagra sum heiti um Hoydalar. Tað má sannast, at umhvørvið í Hoydølum er vakurt og sermerkt.

Hoydalar er eitt skilmarkað landafrøðiligt øki, eitt mentanarlandslag, sum hevur serlig samfelagslig eyðkenni. Eitt mentanarlandslag er mannaskapt, og í hesum føri er ið hvussu er trý sjónsk eyðkenni:

1) veltur bøur – Sanatoriutrøðin og Hoydalstrøðin eystanfyri Sanatoriið
2) bygt øki – Sanatoriið sum sjálvstøðug bygningaeind
3) træplanting omanfyri Sanatoriið

Sambært eini frílendisætlan fyri Boðanes og Hoydalar (2017) verður økið greinað sum ein *brúksætlan* og ein *brúksskipan* við atliti at náttúru- og frílendisupplivingum.

Sanatoriið varð bygt í óbygdum í 1908, men Hoydalar eru í dag inni í býnum. Økið Boðanes-Hoydalar er sambært serstakari byggisamtykt eitt D1-øki, t.e. alment fríøki. Í frílendisætlanini verður Sanatoriið ikki viðgjørt fyri seg, tó at tað er viðmerkt í ætlanini. Frílendisætlanin talar til Sanatoriið og viðarlundina, og økið er greinað *"við atliti at lendi, náttúru, siðsøgu og tekniskum virðum og bindingum v.m."*

Tað er av týdningi at síggja Niðaru Hoydalar sum eina heilskapaða og varðveitta heild. Tað eru bygningssøgulig, og tí mentanarsøgulig virði á Sanatoriinum. Sosialsøgan er um tuberklar, sjúku og deyða, sum Sanatoriið myndaði árini 1908-62. Sum bygningsverk er Sanatoriið eindømi. Sanatoriið er tann sjúkrahúsbygningur, sum stendur nærum í upprunalíki. Sanatoriitrøðin, viðarlundin og Hoydalar eru eitt sameint mentanarlandslag, sum vegna vantandi hald og rókt stendur sum eitt viðkvæmt mentanarumhvørvi við eyðkennum, sum hava virði frá okkara felags samtíð.



*Dunnuhylurin og lítla Dunnuhúsið (Tjóðsavnið, SNR. 8253F120)*



*15. oktober 2019. Símun Dalsgaard og Janus Mohr í túninum við Gamla Hús. Báðir eru føddir í 1936 og innføddir hoyvíkingar. Teir hava verið góðir í ráðum og hava sagt frá, hvussu Sanatoriið sá út í teirra tíð. (Mynd: Ólavur H. Øster)*




**Sanatoriið og allir fimm liggihallir.**
*Ein sjúklingur hevur greitt frá, at hallirnir høvdu nøvn:*
*1. Høsnarhallur, 2. Tvasshallur og 5. Piparhallurin.*
*Ivi er um 3. og 4. men ein nevndist Jomfrúhallurin, og ein Kongahallurin.*
*(Tjóðsavnið, SNR. 6632F023).*

### Bókmentir og annað tilfar


Absalonsen, Hanna 1987: *Studentaskúlin 1961.*
In: Føroya Studentaskúli og HF-skeið 50 ár 1937-1987. (42-49)
Tórshavn.

*Beretning om Færøernes sygehuse 1961-62*: 1968.
Tórshavn.

Bonnevie, E. 1975: *Landssjúkrahúsið og statshospitalet i Tórshavn.*
In: Tidsskrift for danske sygehuse, 51. årg., april 1975. (81-99)
Foreningen af Sygehusadministratorer i Danmark.

Bærentsen, C. 1908: *Om Optagelse af Patienter paa Sygehuset i Hoydal.*
Dimmalætting. (serprent)

Danielsen, D.P. 1994: *Mikkjal á Ryggi 1879-1979.*
In: Heini F. Petersen og Jákup Reinert Hansen (rits.): Mikkjalsbók. (15-27)
Bókadeild Føroya Lærarafelags.

*Frílendið Boðanes – Hoydalar. Frílendisætlan*: 2017.
Umhvørvisstovan.

*Hann vann á tuberklum í Føroyum*: 1974.
In: Tíðindablaðið 19. apríl 1974.

Hoydal, Karsten 1971: *Leikapettið.*
Forlagið Tyril, Tórshavn.

Hoydal, Karsten 1972: *Teinur og tal. Yrkingar.*
Emil Thomsen, Tórshavn.

Jacobsen, Elin Súsanna 2004: *Slóðir í heilsuverkssøguni.*
Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn.

Jákupsstovu, Beinta í 2006: *Kunnskap og makt – Færøysk helsepolitikk gjennom 150 år.*
Fróðskapur, Faroe University Press, Tórshavn.

Jespersen, Jógvan 1987: *Føroya Studentaskúli 1937-1987.*
In: Føroya Studentaskúli og HF-skeið 50 ár 1937-1987. (9-18)
Tórshavn.

Joensen, H.D. 1956: *Tuberklarnir í Føroyum í 19. og 20. øld.*
Fróðskaparrit 5. bók, 2-84.
Mentunargrunnur Føroya Løgtings, Tórshavn.

*Katrin Dahl: Um Dr. Magnussen*: 2006.
In: FF-Blaðið nr. 364 2006.

Løgtingstíðindi 1906, 1926, 1931, 1932

Leivsson, Tróndur G. 1989: Øki løgd til viðarlundir í Føroyum 1885-1985.
In: Andrias Højgaard, Jóhannes Jóhansen og Søren Ødum (rits.)
Træplanting í Føroyum. (35-49)
Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn.

Mitens, Edw. 1966: *Eg minnist – løgtingsmaður 1916-1939.*
Tórshavn.

*Søgan um 'pirkuna'*: 2006.
In: FF-Blaðið nr. 364 2006.

*J.P. Trap Danmark. Færøerne*: 1968.
5 udg.
G.E.C. Gads Forlag, København.

**Kringvarp Føroya**
Dagmar Joensen-Næs og Sigrun Samuelsen: *Tuberklarnir í Føroyum 1-3*: 1990
Brot úr røðini: https://foroysksoga2.sbok.nam.fo/index.php?id=318

**Tjóðskjalasavnið**
Des. A. 45. Tuberkulosesygehus for Færøerne. V. & B. Ingemann, Architecter.
Kbh. Maj 06. Í: Registrering af kort og tegninger. (Registranten, Tina Jørgensen)
Des. A. 78. Projekt Tuberkulosesygehus for Færøerne (Plan af Stuen).
Í: Registrering af kort og tekninger. (Registranten, Tina Jørgensen)
Færø Amt/Ríkisumboðið A-1040/05 Heilsuverk/annað
Tuberklar og tuberklasjúkrahús Tuberkulose Sygehus 1904-1913 M-L0001

Færø Amt/Ríkisumboðið A-1040/05 Heilsuverk/annað
Sanatoriesagen 1906-1911 M-L0002
(væsentligt ang. opførelse af Sygehuset i Hoydal).

Færø Amt/Ríkisumboðið A-1040/05 Heilsuverk/annað
Sanatoriesagen 1909-1920 M-L0003

Færø Amt/Ríkisumboðið A-1040/05 Heilsuverk/annað
Tuberklar og tuberklasjúkrahús Tuberkulose Sygehus
Sanatoriebygning 1906-1909
Sanatoriesagen 1906-1909
Lejekontrakt 1907-1934 M-L0004

Færø Amt/Ríkisumboðið A-1040/05 Heilsuverk/annað
Tuberklar og tuberklasjúkrahús
Sanatoriesagen 1910-1919 M-0005

Færø Amt/Ríkisumboðið A-1040/05 Heilsuverk/annað
Tuberklar og tuberklasjúkrahús
Sager vedr. Sanatoriet 1920-39 M-L0006.


Á Sondum heima á Sandi, februar 2020

# FORNMINNI OG BAKKAVERJUR

## Seinastu árini hevur javnan verið at hoyrt fjølmiðlarnar umrøða, at fornminni farast av brimi við strendurnar kring oyggjarnar

**Tekstur: Símun V. Arge, fornfrøðingur**

**Kanska einamest hava vit hoyrt**, at fornminni í Kirkjubø eru í vanda fyri at verða skolað burtur. Tó, hesin vandin finst víða hvar kring landið. Eyðvitað eru fornir bústaðir hóttir av brimi, tí siðvenja hevur verið, at búleikast hevur verið fram við sjónum. So hvørt bygt hevur verið av nýggjum, eru búsetingarnar fluttar niðan frá bakkatromini. Tjóðsavnið hevur leingi verið vitandi um, at fornar bústaðaleivdir liggja og forfarast av brimi, ið máar bakkar og fjøru – eitt nú heima á Sandi og í Hvalba. Tí hevur savnið kunnað seg um, hvat gjørt verður aðrastaðni.

Tað er ikki bert í Føroyum, at vit noyðast at taka støðu til henda spurning. Seinnu árini hevur spurningurin verið fastur táttur á norðurlendskum og altjóða fornfrøðiligum ráðstevnum. Har hava dømi verið løgd fram og umrødd, og høvi hevur verið at sæð og mett um tey ítøkiligu stig, ið eru tikin í londunum kring um okkum. Longu árini 2008-10 var Tjóðsavnið partur av arbeiðsbólki undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, har arbeitt varð við vandamálinum viðvíkjandi veðurlagi og mentanararvi undir heitinum *Veðurlagsbroytingar og árin á fornminni og mentanarumhvørvi*. Arbeiðsbólkurin kom í 2009 við frágreiðingini *Kulturminner, kulturmiljø og landskap i Norden*.

Tjóðsavnið hevur við fleiri høvi gjørt vart við henda spurning, tí mett hevur verið, at hetta fór at vera ein av stóru avbjóðingunum í arbeiði stovnsins í komandi tíðum. Í nøkrum førum eru kanningar og skrásetingar gjørdar á ávísum støðum fyri betur at fáa yvirlit yvir vandan har. Og sjón gongur fyri søgn – her er veruligur vandi á ferð, og neyðugt er við ítøkiligum átøkum, skulu vit ikki missa fremstu

# FORNMINNI OG BAKKAVERJUR





Verjugarðurin, sum Jóannes bóndi læt gera fyri at verja “Líkhús”



Á Sondum. Tom Dawson t.v. greiðir frá



Nøgvar fornleivdir eru at síggja í bakkanum á Bønhúsflotu

heimildirnar til elstu søgu okkara – tær fornu bústaðaleivdirnar. Tað gav at bíta, tá tað við kolevnistíðarfestingum av sýnum frá rannsóknunum av bakkanum á Sondum heima á Sandi 2006-07 varð prógvað, at búleikast hevur verið har á staðnum longu í 4.-5. øld og fram til dagin í dag! Aðrastaðni er støðan øðrvísi sjónlig – til dømis í Kirkjubø, har kirkjutoftin frá 1400-árunum, vit nevna Líkhús, stendur ytst á bakkatromini, og har bert norðurmúrurin og partar av vesturendanum standa eftir – restin er farin í havið. Høvdu ikki verndargarðurin undir Líkhúsi, ið Jóannes Patursson, bóndi, gjørdi í 1945 og bakkaverjan undir sóknarkirkjuni, ið grótsmiðurin av Argjum, Niels Lassen Arge, gjørdi í 1870, verið gjørd, hevði óivað lítið ella neyvan nakað verið eftir av hesum fyri okkum ómissandi kirkjubygningum.

Tjóðsavnið hevur eisini tikið stig til fyribils bakkaverjur. Hetta var á Sondum heima á Sandi, aftan á at kanningar vóru gjørdar av bakkanum í 1996 og aftur í 2008. Einki er at taka seg aftur í, at hesi tiltøk munaðu, men sum frá er liðið, hava hesar verjur ikki hildið, og nú er aftur galið. Somuleiðis hevur Tjóðsavnið bøtt um skaðar á verjuna undir Líkhúsi eins og undir kirkjuni í Kirkjubø. Í Hvalba vóru eisini stig tikin til bakkaverju. Hetta varð gjørt, eftir at savnið hevði kannað bakkan undir fyrndarbýlinginum við Neyst í Hvalba í 1996. Tá samstarvaðu Hvalbiar kommuna, Landsverk og Føroya Fornminnissavn, sum tað æt tá, um at leggja eina bakkaverju undir bakkan har á staðnum.

Sum skilst, hevur málið verið viðgjørt í nøkur ár, uttan at nøkur ítøkilig verjutiltøk eru komin burturúr uttan tað nevnda í Hvalba. Stóri spurningurin hevur verið, hvør formliga varðar av málinum. Einki lógargrundarlag er, ið staðfestir, hvør hevur ábyrgdina av at gera bakkaverjur kring landið, og eingin semja er gjørd millum land og kommunur um uppgávu- og ábyrgdarbýtið. Tó er greitt, at landið varðar av fornminnunum, og tað var við støði í hesum, at 1 mió. kr. í 2018 vórðu settar av á løgtingsfíggjarlógini at gera bakkaverju í Kirkjubø og møguliga aðrastaðni við.

Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri Tjóðsavnið, Landsverk, Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið arbeiddi við málinum um bakkaverju í Kirkjubø longu í 2012, men tá var eingin játtan til endamálið. Sum nevnt, var fyri fyrstu ferð serstøk játtan til endamálið í 2018, men av tí at forkanningarnar ikki komu nóg langt í 2018, varð játtanin flutt til 2019.

Sum liður í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum og út frá sambondum, savnið hevur havt við útlendskar granskarar og serfrøðingar á økinum, var skotski fornfrøðingurin, Tom Dawson, boðin til Føroya at umrøða bakkaverjuspurningar og avbjóðingar við atliti at mentanararvi okkara. Dawson er granskari við University of St. Andrews í Fife í Skotlandi.

Á fundi í mentamálaráðnum har Dawson eisini fekk høvi at hitta táverandi landsstýrismannin í mentamálum, Høgna Hoydal, greiddi hann frá umfatandi virksemi sínum í felagnum SCAPE (Scottish Archaeology and the Problem of Erosion), sum varð sett á stovn í 2001. Í SCAPE arbeiða serfrøðingar saman við fólki í lokalsamfeløgum kring Skotland og skotsku oyggjarnar við verkætlanum, ið hava til endamáls at verja, varðveita og miðla tey fornminni, ið eru í vanda fyri at fara í havið. Eins og í Føroyum



Dronumynd av bakkanum á Sondum



Dronumynd av toftunum á Bønhúsflotu í Nesi í Hvalba



Við Neyst í Hvalba 1996

er nógvastaðni sera harðbalið fram við skotsku strondini, og nógvastaðni máar burtur av bakkanum.

Tom Dawson vísti á, at tað í høvuðsheitum eru tríggjar tilgongdir til handfaring av fornminnum í økjum, har vandi er fyri, at fornminni fara í havið. Tað er at tryggja lendið og fornminnini við at byggja bakkaverjur, at lata standa til og lata fornminnini fara í havið, ella at stíla fyri rannsókn av fornminnunum, so tey á tann hátt eru skrásett, og vitanin, tey hava í sær, er tryggjað fyri eftirtíðina. Verður ein bakkaverja gjørd, er tað neyðugt at gera sær greitt, at bakkaverjan skal gerast á rættan hátt, og at hon skal haldast við líka, tí annars er vandi fyri, at fornminnini fara í havið, hóast tiltøk eru gjørd, ið eru ætlað at verja fornminnini. Síðan 1990 er stórt arbeiði gjørt við at skráseta lendi og fornminni fram við allari strondini í Skotlandi og skotsku oyggjunum.

Undir vitjan Dawsons í juli mánaði varð vitjað í Kirkjubø og heima á Sandi saman við fólki frá Tjóðsavninum og Landsverki. Vitjað var eisini á Bønhúsflotu í Nesi í Hvalba, í Sjóvartoftum á Nesi í Vági, í Kirkjumýri í Porkeri, og hugt varð eisini eftir bakkaverjuni í Sumba. Í sambandi við vitjanina á Bønhúsflotu í Nesi í Hvalba var økið 3D-skrásett við dronu.

Tað er greitt, at eisini í Føroyum er tørvur á, at støða verður tikin til vernd av teimum fornminnum, ið eru í vanda fyri at fara í havið, tí tað máar av bakkanum. Tey støð, Tjóðsavnið serliga hevur havt eyguni eftir, eru eitt nú bakkin á Sondum heima á Sandi, bakkin undir Líkhúsfløtti í Nesi í Hvalba, har tørvur er á bráðfeingis støðutakan til vernd av fornminnunum. Tað eru tó serliga fornminnnnini i Kirkjubø – sóknarkirkjan og Líkhús – ið hava verið umrødd í sambandi við vandan fyri at fara í havið. Men eisini bakkin fram við fjøruni undir Múrinum er viknaður, og fer hann tí eisini at verða fevndur av tryggingartiltøkum.

Landsverk og Tjóðsavnið hava staðið fyri fyrireikingini og bráðfeingis umvælingararbeiðunum, og er hetta gjørt í samstarvi við Landsbyggifelagið og Dansk Hydraulisk Institut.

## NIÐURSTØÐA

Arbeiðsbólkurin kom til ta niðurstøðu, at neyðugt er við játtan komandi árini til bakkaverju í Kirkjubø og møguliga aðrastaðni. Hóast landið hevur ábyrgd av friðaðum fornminnum, so er einki lógargrundarlag, ið staðfestir, hvør hevur ábyrgdina av at gera bakkaverjur framman fyri friðað fornminni.

Fyri ta einu milliónina, sum var á fíggjarlógini fyri 2019 til bakkaverjur í Kirkjubø og aðrastaðni, vórðu umfram forkanningar og bráðfeingis umvælingar í Kirkjubø og á Sondum á Sandi, gjørdar fyrireikingar til endaligar loysnir á hesum støðum eins og dronuskrásetingar á Bønhúsflotu í Nesi í Hvalba.

Víst varð á, at tørvur eisini verður á játtan, so Tjóðsavnið kann fara undir eina verkætlan, har farið verður undir at skráseta fornminni fram við strendurnar fyri at staðfesta, hvar og hvør vandin er, og hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk, so at missurin verður hin minsti, eins og at gjørdar kunnu verða raðfestingar av bakkaverjum. Eisini er ynskiligt at seta í verk eina skipan, har staðkend fólk kring landið kunnu halda eyga við og boða frá møguligum broytingum í bakkanum og skaða á bakkaverjur framman fyri fornminni.

Ein nærri lýsing av teimum vandum, ið fornminni fram við føroysku strendurnar eru fyri, kunnu millum annað lesast í greinini *Hækkandi hav kann hótta føroysk fornminni*, sum stóð í Fróði 2/2009. Her greiðir Símun V. Arge frá, hvussu fornu búsetingarnar kring landið kunnu koma í vanda av veðurlagsbroytingum, har bakkin verður máaður.



“Okshús” sæð úr erva við dronu

FORNFRØÐI Í 2019

# FORNMINNA-SKRÁSETING KRING LANDIÐ

Umframt at standa fyri fornfrøðiligum rannsóknum og útgrevstrum hevur Tjóðsavnið lógarbundnu uppgávuna at gera lista yvir jarðføstu fornminnini í Føroyum og at hava eftirlit við teimum

Tekstur: Helgi D. Michelsen, savnsvørður

**Fornminnalógin** kom í gildi í 1948 og Føroya Fornminnissavn, varð sett á stovn í 1952. Tá varð fornminnaskrásetingin skipað undir leiðslu av fornfrøðinginum Sverra Dahl. Sverri fór út um landið og skrásetti og savnaði inn vitan um toftir og staðir av søguligum týdningi, sum eftir lógini verða mett sum friðað jarðfest fornminni. Í hesum gomlu skrásetingunum eru fornminnini tó ikki altíð neyvt staðsett og uppmáld.

Skrásettu fornminnini síggjast á kortinum yvir jarðfest fornminni á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum, sí kort á https://www.tjodsavnid.fo/jardfest-fornminni. Kortið er ikki endaligt, tí tað leggjast alla tíðina fornminni afturat, so hvørt tey verða funnin og fornfrøðiliga skrásett. Á fornminnakortinum eru fyrndarbýlingar og toftir úr víkingatíð og miðøld. Eisini eru yngri toftir, eitt nú vakhús, ið m.a. vórðu nýtt, tá sjóræningar herjaðu í Føroyum. Tjóðsavnið arbeiðir við at dagføra kortið við fleiri fornminnum, eitt nú við rúgvusmiklu krígsminnunum frá seinna heimsbardaga. Tjóðsavnið hevur tikið stig til at gera eina meira nágreiniliga lendisskráseting, so allar sjónligar toftir og mannaskapt spor kring alt landið verða skrásett og kortløgd. Tjóðsavnið er farið undir verkætlan at skráseta, lýsa og staðseta fornminnini við GPS'ara. Harumframt verða neyvar 3D uppmátingar gjørdar av toftum og lendum, ið hava serligan søguligan áhuga og týdning. Ætlanin er soleiðis at koma stigvíst runt allar Føroyar við nýggju fornminnaskrásetingini. Hetta er eitt stórt arbeiði, ið vit vóna fer at bera á mál við hjálp frá bygdasøvnum og áhugaðum. Vit taka tí eisini fegin ímóti rættingum og ískoytum til fornminnakortið frá staðkendum og áhugaðum fólki.



*Helgi D. Michelsen, fornfrøðingur ger dronuna klára at skráseta*

Í juni í 2019 varð fyrsta stig tikið í hesi ætlan, tá fólk av Tjóðsavninum fóru út til Svínoyar at skráseta fornminni.

## FORNMINNA-SKRÁSETINGIN Í SVÍNOY 2019

Ein týðandi partur av fornminnaskrásetingini er at savna inn vitan frá fólki, ið kenna mentanarlandslagið á staðnum og tær søgur og staðarnøvn, ið knýttar eru at tí. Á túrinum úti í Svínoy vórðu heimildarfólkini Jógvan Edmund á Geilini, Marius á Geilini, Óli á Geilini og Símun Hansen. Hesir búgva allir í Svínoy og hava hollan kunnleika og áhuga fyri mentanararvi okkara. Umframt at vísa okkum runt í bygdini, vístu heimildarfólkini eisini fram ymsar forngripir, ið millum ár og dag eru komnir undan kavi í Svínoy, so vit kundu avmynda gripirnar og skriva niður, hvar teir vórðu funnir.

*Forvitnisliga toftin “Antinisból” í Svínoy*



Í Svínoy skrásettu vit fornminni bæði innan- og uttangarðs við GPS´ara. Harumframt gjørdu vit 3D skrásetingar av mentanarlandsløgum og krígsminninum á Draganum og av toftini Okshús í Miðalbergsdali, umframt av fornminnalandslagnum kring kirkjuna. Á kortinum á næstu síðu verður víst til støðini, sum eru skrásett.



*Við Gellingarklett var ein ætlan um at seta upp vindmyllur. Har eru eisini fornminni*



*Úthús við taksteinum framleiddir í Svínoy undir seinna heimsbardaga*



*Kort yvir Svínoynna. Grønu prikkarnir vísa, hvar fornminnaskrásetingar vórðu gjørdar. Toftin “Okshús”, sum liggur í Miðalbergsdali sunnantil á Svínoynni, er serliga frámerkt*

Millum frásagnirnar úr Svínoy er áhugaverda søgan um, tá taksteinar vórðu framleiddir úr betongi í Svínoy. Á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum er greinin “Ein ídnaðarsøga úr Svínoy” eftir Herleif Hammer.

## SAMFELAGS-ÚTBYGGINGAR OG NÝGGJAR VINDMYLLU-LUNDIR HAVA VIÐ SÆR FORNFRØÐILIGAR LENDISSKRÁSETINGAR

Tá útbyggingar verða gjørdar í samfelagnum, ger Tjóðsavnið eisini fornfrøðiligar lendisskrásetingar. Serliga tá nýggjar útstykkingar, vegagerð, rør- og kaðalveitir og nýveltingar í landbúnaðinum verða gjørdar, er neyðugt við fornfrøðiligum lendisskrásetingum. So hvørt sum Føroyar fáa grønari orkuframleiðslu, ger Tjóðsavnið eisini fornfrøðiligar lendisskrásetingar á økjum, har ætlanin er at seta upp vindmyllur.

Í 2019 framdi Tjóðsavnið fornfrøðiligar lendisskrásetingar í sambandi við tvær vindmylluætlanir í Suðurstreymoy. Við Gellingarklett í norðara parti av Hoyvíkshaga og við Bøllureyn í Flatnahaga. Triðja ætlaða vindmylluøkið, ið varð fornfrøðiliga lendisskrásett í 2019, var í Dalhaga í Porkeri.

Tunnilsverkætlanir eru aðrar stórar samfelagsútbyggingar, ið hava havt við sær fornfrøðiligar lendisskrásetingar í 2019. Í mai mánað vóru lendisskrásetingar í sambandi við Dalstunnilin gjørdar í Húsavík og í Dali, og í juni var Tjóðsavnið og gjørdi lendisskrásetingar í Klaksvík, Árnafirði og á Norðtoftum í sambandi við tunlarnar norður um fjall.

Tá verkætlanir, ið gera stór inntriv í landslagið, so sum tunnilsverkætlanir, verða gjørdar, skrásetir Tjóðsavnið lendið í 3D við dronu, fyri á tann hátt at skjalfesta mentanarlandslagið, ið einaferð var.

Ein onnur stór byggiætlan, har Tjóðsavnið gjørdi 3D lendisskrásetingar í 2019, var í Ónavík í Vágs kommunu, har Bakkafrost arbeiðir við eini ætlan um at byggja stóra smoltstøð.

Av øðrum støðum, har ið Tjóðsavnið í 2019 hevur gjørt fornfrøðiligt skrásetingar- og eftirlitsarbeiði í samband við ymiskar byggiverkætlanir, kunnu nevnast í Vági, Runavík, Norðragøtu, Syðrugøtu, Klasvík, Ánunum, Haraldssundi, Hvalba og í Tórshavn.



*Fornminnaskráseting í Árnafirði í sambandi við tunnilsverkætlan*

# FORNFRØÐILIGAR RANNSÓKNIR

Tjóðsavnið framdi tveir fornfrøðiligar útgrevstrar í 2019

**Tekstur: Helgi D. Michelsen, savnsvørður**



*Útgrevstur á Velbastað. Balkurin verður gravaður niður*

## FORNFRØÐILIGAR RANNSÓKNIR



Bringsnagøta 13.
Eldstaður og steinsetingar

**Annar útgrevsturin** var í sambandi við niðurtøku og endurbygging av gomlu húsunum, hjá Skómakaranum kallað, í Bringsnagøtu 13 í Tórshavn. Hetta var ein sonevndur neyðgrevstur, har Tjóðsavnið gjørdi rannsókn , tí gravast skuldi niður á hellu fyri at sleppa undan fukti í nýggju húsunum. Hin útgrevsturin var framhald av fornfrøðiligu granskingarrannsóknini niðri á Bakka á Velbastað.

### FORNFRØÐILIGUR ÚTGREVSTUR Í BRINGSNAGØTU 13 Í TÓRSHAVN

Bringsnagøta bindur saman eystaru og vestaru vág í Havn og fylgir gamla markinum millum Havnar bý fyri sunnan og Húsagarðsfestið fyri norðan. Áhugavert var tí at fáa fornfrøðiliga kannað, hvussu leingi bygt hevur verið á staðnum, og harvið eisini fáa staðfest, nær býurin vaks seg so langt norður.

Eigararnir vístu skynsemi og boðaðu Tjóðsavninum frá, áðrenn niðurtøkan og útgrevsturin fyri nýggju húsunum fór í gongd. Hetta førdi við sær, at fornfrøðiligu kanningarnar vórðu lagdar inn í tíðarætlanina í byggiverkætlanini heldur enn at seinka arbeiðinum.

Fyri at varðveita minnini um húsini best møguligt, gjørdi Tjóðsavnið eina 3D skráseting av húsunum áðrenn niðurtøkuna. Undir trægólvinum var partvíst varðveitt moldgólv, og har varð funnið bygningsleivdir úr viði og skifurtaksteinar.



*Ílatabrot funnið í grevstrinum í Bringsnagøtu, har partur av framleiðsluárinum 1746 er málað*



*Húsið, ið varð niðurtikið á Bringsnagøtu 13*

Grundarsteinar og steinsett tún, ella møguliga gøta, vórðu grivin fram undir gólvinum. Hetta vísti, at eldri hús hava staðið eitt sindur sunnari enn tey, ið vórðu niðurtikin. Ein steinsettur eldstaður var eisini grivin fram eins og steinsettar rennur, ið vórðu klæddar innan og lokaðar við viði. Forngripirnir, eitt nú ílatabrot og brot av kritpípum vórðu tíðarfestir frá uml. 1700. Eitt av ílatabrotunum var serliga lætt at tíðarfesta, har stóð framleiðsluárið 1746 málað á. Sostatt vísti fornfrøðiliga rannsóknin, at tað var uml. ár 1700, at hús vórðu bygd so langt niðan móti býarmarkinum, sum tá lá við Bringsnagøtu.

### GRANSKINGARVERKÆTLAN UM FORNAR KIRKJUR, BØNHÚS OG KIRKJUGARÐAR Í FØROYUM

Útgrevsturin niðri á Bakka á Velbastað er liður í eini granskingarverkætlan um fornar kirkjur, bønhús og kirkjugarðar og nýggja tøkni í fornfrøðini.

Tjóðsavnið hevur seinnu árini lagt seg eftir at menna fornfrøðina tøkniliga. Hetta skal til fyri at fornfrøðiligu rannsóknirnar gerast meira málrættaðar, bíligari og minni tíðarkrevjandi. Tøkniliga menningin er eisini neyðug fyri at skapa fortreytir fyri einum smidligari samskifti millum planleggjarar og fornminnamyndugleikan. Á Tjóðsavninum er tøkniliga menningin í fornfrøðini skipað í eini granskingarverkætlan um fornar kirkjur, bønhús og kirkjugarðar í Føroyum. Í verkætlanini verða kirkjuligu toftirnar og mentanarlandsløgini kring toftirnar skrásett í 3D við dronu, og lendið verður skannað við georadara ella GPR (Ground Penetrating Radar). Georadaramyndirnar verða síðani eftirkannaðar við fornfrøðiligum rannsóknarveitum á útvaldum støðum, og samanbering verður gjørd millum georadaramyndirnar og tær framgrivnu flatunar. Endamálið við hesum er at læra okkum at tulka georadaramyndir fornfrøðiliga.

Tá fólk settu búgv á Velbastað, var tað við sjóvarmálan niðri á Bakka. Brimið hevur síðan máað so nógv av upprunalendinum, at tað gjørdist neyðugt at flyta bygdina niðan, har hon nú er. Í bakkanum síggjast nú bert leivdir eftir búsetingina. Nakað inn frá bakkanum er ringleitt vallað garðlag við lítlari kirkjuella bønhústoft í miðjuni. Staðið verður nevnt Kirkjugarðsbakki og kirkjugarður, so vitanin um hendan kirkjustað er varðveitt í staðarnavninum, hóast søgan um kirkjustaðin og tilhoyrandi búseting er fánað burtur. Bert fornfrøðiligar rannsóknir kunnu fáa vitanina um staðin fram aftur.

At brimið máar burtur av bakkanum ger eisini, at fornminnini niðri á Bakka eru hótt, og tí fall valið at gera fornfrøðiligan útgrevstur her, heldur enn aðrastaðni, har fornminnini liggja tryggari varðveitt í moldini.

Undanfarin ár hava fornfrøðiligu veitirnar verið í kirkjugarðinum uttanfyri kirkjubygningin. Komið varð fram á gravir, ið vóru so illa farnar, at bert tenninar av teimum jarðaðu vóru varðveittar. Fleiri sjáldsamir gripir vóru tó varðveittir í moldini. Vit funnu ein enskan silvurmynt, sum kann dagfestast til fyrst í 900 árunum og ein krossmerktan fingurring úr gyltum silvuri. Fingurringurin er gátuførur, tí vit vita ikki, hvaðani hann stavar, og enn hava vit ikki funnið hansara líka.

Summarið 2019 varð sjálvur kirkjubygningurin niðri á Bakka grivin fram. Undir svørðinum lógu tætt pakkaðir steinar. Hetta tulkaðu vit sum bygningsleivdir, ið einaferð í tíðini eru sléttaðar, helst fyri at fáa eina grasflotu og harvið meira bit til kríatúrini. Toftir av fiskahjøllum standa stutt frá, uttast á bakkanum, og hugsast kann, at grót eisini er tikið úr kirkjutoftini og er endurnýtt til at byggja hjallarnar við seinni í tíðini.

Tá tættpakkaðu steinarnir vórðu ruddaðir burtur, varð komið niður á vakurt steinsett gólv og veggir. Durur var í vesturendanum. Eysturendin, har altarið hevur verið, var bogaður. Húsið er lítið, umleið 4 m langt og 3 m breitt innan. Í støðd og skapi er bygningurin líkur bønhústoftini í Leirvík, og vit kunnu tí staðfesta eitt serstakt føroyskt slag av bønhúsum.



*Útgrevstur á Velbastað. Kirkju- ella bønhústoftin*

Vit vita ikki, hvussu leingi kirkja ella bønhús hevur verið niðri á Bakka, men í samstarvi við Moesgaard Museum vórðu brend byggkorn, ið vóru funnin undir vegginum á hesi yngstu fasuni av kirkjuni, send til tíðarfesting á Poznan Radiocarbon Laboratory í A. Mickiewicz University í Pólandi. Bíðað verður í spenningi til úrslitið av tíðarfestingum verður tøkt í 2020.

Forngripirnir, ið vit funnu, so sum ílatabrot úr fitisteini og føroyskum leiri, benda á, at búsetingin, ið hevur hoyrt til kirkjustaðin, stavar úr víkingatíð ella miðøld. Flestu ílatabrotini og hitasprongda malagrótið lógu vestan fyri kirkjubygningin, og hetta fær okkum at halda, at búsetingin hevur ligið vestanfyri. Við vón um at kunna staðseta búsetingina vestan fyri kirkjugarðin, valdu vit tí at gera georadarkanningar í einum øki har. Fyri at kunna lesa geogradardáturnar er neyðugt við eftirviðgerð, ið verður gjørd á vári 2020. Umframt útgrevstrarnar í Bringsnagøtu og niðri á Bakka á Velbastað, framdi Tjóðsavnið eisini fornfrøðiligt skrásetingar- og eftirlitsarbeiði í sambandi við ymiskt alment og privat grevstrararbeiði.

*Útgrevstur á Velbastað*



# VARÐVEITINGAR-ARBEIÐIÐ Í KIRKJUBØ 2019

Eftir páskir varð farið undir varðveitingararbeiðið í Kirkjubø. Eins og í fjør varð arbeitt á tveimum mótum – á Múrinum og á Líkhúsi

**Tekstur: Símun V. Arge, fornfrøðingur**

## MÚRURIN

Beint fyri páskir varð farið undir at fáa ymist tilfar til arbeiðsplássið við Múrin.

Konserveringsarbeiðið í ár fevndi um kapellið – ella Nunnukleystrið, sum tilbygningurin eystast á norðursíðuni á Múrinum eisini verður nevndur.

Í ár var tó ikki sum undanfarin ár neyðugt at seta upp stóru arbeiðspallarnar og at taka fyribilsveðurverjuna niður. Hetta, tí valt varð at lata fyribilsverjuna standa uppi fyri at nýta hana sum skjól og lívd móti regni og vindi í hesum avmarkaða parti av dómkirkjutoftini, soleiðis at tað var arbeiðandi í at kalla øllum veðri.

Arbeiðið í ár var framhald av tí varðveitingarætlan fyri Múrin, sum stungin varð út í kortið í áliti, landsstýriskvinnan við mentamálum góðkendi í januar mánaði 2010.

Arbeiðið fevndi um at konservera múrverkið á kapellinum fyri norðan, vestan og eystan, eins og sunnan, ið eisini er eystasti partur av norðurmúrinum í sjálvari kirkjuni – bæði innan og uttan. Arbeiðspallur varð tó settur upp inni í kapellinum, lokað varð fyri vindeygaopunum í múrverkinum fyri eystan og vestan, og op vórðu gjørd í veðurverjuna, ið virkaðu sum takljós, soleiðis at dagsljós eisini fekst inn í rúmið, har arbeitt varð.

Ein annar liður í varðveitingararbeiðinum var aftur í ár bygningafornfrøðiligu skrásetingarnar. Hesar skrásetingar leggja dent á siðsøgulig og byggilistarlig viðurskifti, sum taka atlit at, hvussu Múrurin er bygdur, hvussu múrverkið er laðað osv. Við kanningini av múrverkinum verður skjalprógvað, hvat er eftir av upprunamúrverki og fugum, og gevur hetta okkum vitan um, hvussu byggiarbeiðið fór fram í miðøldini.



Veðurverjan á "Kapellinum" 2019

Varðveitingararbeiðið hevur verið lagt soleiðis til rættis, at bygningafornfrøðiligu kanningarnar verða gjørdar undan og saman við sjálvari múrkonserveringini.

Tá hetta arbeiðsumfarið kom at enda í august mánaði, var konserveringsarbeiðið upp á Múrin komin so langt ávegis, at fyribils veðurverjan og arbeiðspallarnir vórðu tiknir niður. Nú stóð ikki bert kapellið, men allur Múrurin berur aftur, múrverkið væl og virðiliga konserverað, og múrkrúnan løgd við flagi. Komandi ár verður so tað, sum eftir er at konservera, gjørt frá jørðini ella lágum pallum.

Sostatt er Múrurin nú aftur komin fram í ljósmálan, og komandi ár er ætlanin, at Múrurin skal standa liðugt konserveraður sambært álitinum frá 2010.

## LÍKHÚS

Beint fyri páskir kom ráðgevi Tjóðsavnsins, konservatorurin Hans Frederiksen, við Norrønu til Føroya, og farið varð undir varðveitingararbeiðið á Líkhúsi.

Fyrstu ferð at Líkhús gjørdist ítøkiligur partur av verndararbeiðinum, var í 2017. Tó so, farið varð so smátt undir at fyrireika verjutiltøk í 2015, m.a. við at gera skrásetingar við dronu, eins og fyribils veðurverja varð løgd yvir mesta partin av norðurmúrinum í kirkjutoftini í 2016. Ætlanin var, at verjan skuldi standa uppi í eini 2-3 ár, so at múrlívið kundi torna. Ymiskt er komið fram við konserveringsarbeiðinum – eitt nú er skilligt, at rættiliga stórir partar í múrverkinum vestast í toftini eru festir við sementi. Nær hetta er gjørt, er óvíst, tí hetta tykist ikki vera skjalprógvað.



Arbeiðsumfarið liðugt. Veðurverjan tikin niður og flag lagt á



Fólk frá NCC seta ristimátaran upp



Nú varð so hildið fram at konservera vestara partin av norðurmúrinum og tað, sum stendur eftir av vesturmúrinum – tað er tað, sum er mest sjónligt har á staðnum. Í fjør varð helmingurin av hesum bygningsparti konserveraður, eitt nú við at festa okkurt av niðurdotna grótinum. Arbeiðið hevur gingið stak væl, og tí er nú helmingurin av veðurverjuni tikin burtur, soleiðis at tann parturin av múrverkinum eisini er konserveraður. Komandi ár er so bert tað eystasta av múrinum eftir at konservera.

Ein serlig avbjóðing hevur verið at seta ein stóran stein upp á pláss aftur. Hann hevur upprunaliga staðið í landnyrðingshorninum, men er gliðin út og hevur ligið á vøllinum í fleiri ár. Hetta verður eisini gjørt komandi ár. Arbeiðið á Líkhúsi helt fram til 15. mai, tá konservatorurin fór av landinum aftur.

Eins og øll árini, arbeitt hevur verið í Kirkjubø, verður dagliga múraraarbeiðið upp á Múrin gjørt av múraravirkinum *Sp/f Krossteig* við Birgiri Krossteig úr Havn. Bygningsfornfrøðiliga skrásetingin verður framd av Jónhild Johannessen, arkitekti, og serkøna konserveringsleiðbeining veitir Hans Frederiksen, konservator, frá fyritøkuni *Nordisk Konservering* í Keypmannahavn. Símun V. Arge, fornfrøðiligur ráðgevi og granskari á Tjóðsavninum, skipar og stendur fyri varðveitingarverkætlanini í Kirkjubø.

## SANDOYARTUNNILIN

Ikki var tað sørt, at fólk umrøddu spurningin um ristingar, nú farið varð undir at spreingja fyri undirsjóvartunnlinum av Gomlurætt til Sandoyar í august mánaði, og hvørja ávirkan tær kundu fara at hava á fornminnini í Kirkjubø.

Tað er greitt, at slíkar spreingingar kunnu elva til ógvusligar ristingar, hóast løtt verður við fyrivarni – alt veldst um, hvørjar jarðfrøðiligar fláir sprongt verður í. Um illa bar til, kundu spreingingarnar hava álvarsligar avleiðingar við sær.

Tí var ikki annað enn at binda um heilan fingur og gera tað, vit eru ment at gera í slíkum fyri okkum óvanligum føri – nevniliga at hava neyvt eftirlit við spreingingunum við at seta upp ristimátara á Múrin og seinni eisini á sóknarkirkjuna.

Í Noregi eru lógarásett krøv um neyðug fyrivarni, ið skulu takast við atliti at mentaminnum, ið liggja nærindis, har slíkt arbeiði fer fram. Tí hava vit tikið støði í hesum ásetingum og nýtt tær í Kirkjubø. Í skrivandi løtu hevur gingist væl – ristingarnar eru ikki komnar nær námind markamótinum, nú tunnilsarbeiðið er um at fara út á sjógv á umleið 50 m dýpi, har leiðin gongur út undir Hólmin suður móti Sandoynni.



## SUMMARIÐ 2019

# HVALASTØÐIN VIÐ ÁIR SÝND FRAM



Nógv fólk vitjaðu í sambandi við, at hvalastøðin læt upp

Hóast tann drúgva restaurerings- og varðveitingarverkætlanin á hvalastøðini ikki er liðug, varð avgerð tikin at gera eina roynd at hava opið ein dag um vikuna

**Tekstur: Erland V. Joensen, savnsvørður**

**Tað er ikki altíð**, at vit sjálv síggja virðini. Antin tí at tað er so gerandisligt, ella tí at vit samanbera við stór bygningsverk úti í heimi. Hvalastøðin hevur síni søguligu spor. Hvalastøðin var partur av einum heimsumfatandi norskum stórídnaði, sum kom her til landið báðumegin 1900. Hesin ídnaður var sjónligur í Føroyum, og serliga í Sundalagnum. Hvalastøðin við Áir var tann seinasta av teimum tilsamans sjey hvalastøðunum, sum komu í árunum 1894 til 1905. Virksemið á hvalastøðini við Áir byrjaði í 1905.

Tað eru so nógvar søgur at siga, og hvalastøðin við Áir hevur nógvar søgur í sær. Hvalastøðin er ídnaðararvur, sum aftur er mentanararvur. Hon er okkara arvur, sum vit gjarna skulu handa víðari til komandi ættarlið. Søgan um húsini, sum hava merkilig og duldarfull nøvn, *Fugan*, *Skarv*, *Kristnastova*, *Grísahúsið*, *Tørkan* og *Kvernan*, *Kemis* og lítla *Perlan* eiga innivist í framtíðini.

Hetta eru leivdirnar av einari ídnaðarmentan, sum hevur í sær søguligt, tøkniligt, sosialt, byggilistarligt og vísindaligt virði – leivdir, sum enn eru, bygningar, maskinur og verksmiðjur, har framleiðsla er farin fram, har orka hevur verið brúkt og borin víðari til eitt undirstøðukervi og har, ið sosialt virksemi hevur verið knýtt at ídnaðinum.

Ídnaðararvur er mentanararvur treytað av, at ein sonevndur funktionellur integritetur er varðveittur og óskaladur. Sum ídnaðarøki lýkur hvalastøðin við Áir hesar treytir. Ektleikin á støðini er enn til, og útgerð, amboð og flestu luteindir eru enn til. Tað er hetta, sum hvalastøðin hevur í sær. Hvalastøðin skal síggjast. Hon hevur sítt egna mál. Hon skal sansast, upplivast. Her angar av lýsi, her er rustur og rot, her er skitið og slitið.

*Hvalastøðin við Áir – eitt* ídnaðarminni/*The Whaling Station – an industrial site* – var opin fyri almenninginum hvønn fríggjadag frá 5. juli og fram til 30. august.

Møguleiki var tekna seg til rundsýningarnar kl. 11, 13 og kl. 15. Olivia Kruse, sum lesur teknoantropologi, og Jacoba Kruse, antropologur, vístu fram á støðini.





*Á planinum*

## Verkætlanin at varðveita hvalastøðina við Áir helt fram



Ingi W. á Tórgarði setur hurð í smiðjuna

**Í sambandi við ætlanina** at hava opið á støðini á sumri 2019 fór tað nógva av játtanini til at hampa um økið. Tó fór tíðin eins og undanfarin ár eisini til umvælingar. Serliga var neyðugt at fáa gjørt økið kring Planin, har nógv fólk ganga, m.a. at stoypa liðugt framvið Planinum. Tað vanliga: at kitta vindeygu og mála hurðar, varð eisini gjørt, og hurðar vórðu gjørdar. Timburdekkið varð oljað, og gongubreytir gjørdar í Pressuni og Kvernuni, eins og brúgvar gjørdar av Planinum uppá Kvernuloftið.

Verkætlanin at varðveita hvalastøðina heldur seg framvegis til 'Ávegis álit um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn'(Mentamálaráðið 2007), og enn ikki eftir álitinum 'Hvalastøðin við Áir. Álit um økisskipan'(Mentamálaráðið 2013).

Teir hentleikar, sum skulu til fyri at hava eina framsýning og savnsvirksemi, eru ikki her, og hús og bygningar á støðini skulu restaurerast innan.

Timburmeistararnir Jón Láadal, Ingi W. á Tórgarði og Martin Mørk hava staðið fyri at umvæla húsini, og Mayfinn Norðoy frá arkitektastovuni Kontrast hevur byggileiðsluna um hendur.

Verkætlanin at varðveita hvalastøðina – árini 2011 til ársenda 2019 – hevur kostað kr. 14,3 mió.

Tekstur: Vónbjørt Tróndheim

# KENNIR TÚ BLÓMURNAR, SUM VAKSA HER Í FØROYUM?

*Sólju og summardá, blákollu og baldursbrá.... Sangin kenna nógv, men visti tú, at ein frálíkur urtagarður við upprunaføroyskum plantum, fleiri av teimum, sum nevndar eru í sanginum, er á Debessartrøð? Og visti tú, at tú kanst fáa avleggarar av hesum – í fleiri førum – sera sjáldsomu plantum?*



Annleyg Patursson í urtagarðinum í Hoyvíksgarði

**Urtagarðurin** varð gróðursettur í 1960unum, so hann er meira enn 50 ára gamal. Talið av plantum hesi árini hevur ligið um 150 sløg.

Urtagarðurin er grundlagdur við plantum, sum upprunaliga allar eru funnar í føroysku náttúruni, og sum síðani eru plantaðar í urtagarðin, tvs allar uttan fransagras, sum við undantaksloyvi er sett niður her úr einum urtagarði úr Hoyvík, hagar tað var komið av Sandoynni. Allar planturnar, sum vaksa her í plantufrøðiliga urtagarðinum úti á Debessartrøð, eru sostatt føroyskar og royndar í føroyskum veðurlagi og føroyska urtagarðinum. So um tú ætlar tær føroyskar plantur í urtagarðin, átti tú at farið tær ein túr á Debessartrøð at hugt – og kanska biðið tær onkran avleggara.

*Ein vaksandi áhugi seinastu árini er fyri tí, sum føroyskt er, og áhugin fyri upprunaføroysku plantunum er ein náttúrlig avleiðing av hesum. Ikki fara út í náttúruna at taka tær plantur, men fær tær heldur ein túr út í plantufrøðiliga urtagarðin, tí fleiri av hesum blómum úti í villu náttúruni eru so fáar.*

## HVØRJAR PLANTUR ERU AT SÍGGJA?

Í plantufrøðiliga urtagarðinum eru í løtuni umleið 140 plantusløg, sum Annleyg Patursson hjúklar um. Av hesum eru øll møgulig sløg av vanligum føroyskum plantum, so sum berjalyngur, sólja og summardái, og eisini pílasløg og baraldur, sum er veturgrønur krúpandi runnur, men eisini nógvar serstakliga sjáldsamar plantur.

*Dømi um sjáldsamar plantur við blómum, sum vaksa í urtagarðinum.*

- Bláklokkan er sera sjáldsom, serstakliga vøkur og veksur væl í urtagarði. Hon blómar í august.
- Fransagras vaks upprunaliga á Sandi, men er fingið higar úr einum urtagarði við serloyvi, fransagrasið blómar í mai.
- Áarneliksrót er sera sjáldsom og veksur í hendinga gjáum, blómar í juli-august.
- Reyð kúpa, blómar í juli – august.
- Lundararmingi er sera sjáldsamur, veksur í vátlendi og er bert funnin í tveimum støðum í Føroyum. Hann veksur sera væl í urtagarði.

Ein onnur sera sjáldsom og áhugaverd blóma at leggja merki til, er reyða várhagasóljan. Hon er serføroysk, veksur sera væl í urtagarðinum. Ein maður fann hana við gøtuna millum Hornabø og Heyggin Mikla. Hann setti hana niður í plantufrøðiliga urtagarðin, har hon nú veksur. Hon hevur gul blomstur og reyð bløð.

Nógvar áhugaverdar søgur eru um ymisku planturnar, og Annleyg veit nógv at siga um planturnar og um, hvør trívist best saman við hvørjari.

Hóast urtagarðurin ikki er mannaður dagliga, so eru fólk altíð vælkomin at vitja hann. Hann er opin árið runt allan sólarringin. Annleyg greiðir frá, at hon er til taks til bæði rundvísing, vegleiðing og góð ráð. Eisini ber til at fáa avleggarar. Tað er bara at ringja ella skriva teldupost til hennara at avtala nær á tel. +298 506252 og teldupostbústaði: blomurokt@gmail.com

Plantufrøðiligi urtagarðurin er vakrastur á sumri, og besta tíðin at fáa avleggarar er eftir 1. mai.



Berjalyngur



Bláklokka



Urtagarðurin á Debessartrøð



Fransagras seint í mars



*Tað er bratt at ganga gjøgnum Leirrók*



# Náttúran í Koltri 2019

## Skipaðar náttúrukanningar í Koltri byrjaðu í 2019

**Tekstur: Janus Hansen, savnsvørður**

Tjóðsavnið bjóðaði fýra næmingum, sum lesa lívfrøði á Fróðskaparsetrinum, at arbeiða við spennandi verkætlan í Koltri. Tey lesandi vóru Eva Kjæld Hansen, Hans Meinhard í Eyðansstovu, Selma Tausen Olsen og Súsanna Leo Bech. Tey arbeiddu upp á skift soleiðis, at tvey vóru í Koltri eina viku í senn.

Frá 10. juni til 27. juli arbeiddu tey við fleiri náttúrukanningum.



*Eva og Súsanna seta fallfellur niður*

### FALLFELLUR

Fallfellur vórðu settar út á kanningarstøð og savnaðar inn aftur. Í hesar fellur koma klukkur, eiturkoppar og annað tílíkt. Tey lesandi arbeiddu síðan við at greina hetta í djórabólkar. 32 fellur vórðu innsavnaðar og higartil eru 12 av teimum greinaðar. Talið av greinaðum dýrum er higartil 4700. Greitt er, at mest er av hoppstertum, men eisini eru nógvar tvíveingjur, æðraveingjur og klukkur.

### REYÐMAÐKAR

Koltur er ein av fáu oyggjunum, sum ikki er fongd við Ný Sælendska flatmaðkinum. Hesin týnir reyðmaðk, har hann kemur, og tí varð avgjørt, at skráseta reyðmaðkin í oynni. Tey fýra byrjaðu at innsavna reyðmaðkar við at stoyta sinnopsvatn í lendið.



*Eva og Selma leita eftir reyðmaðkum*

Henda mannagongd verður brúkt aðrastaðni, og ger tað, at reyðmaðkarnir koma upp úr svørðinum. Tó, hetta vísti seg ikki at rigga so væl, so mannagongdin bleiv broytt, og ístaðin bleiv leitað í moldini.

### DÝR Í MOLDINI

Umframt reyðmaðkar, er tað ymiskt annað, sum livir í moldini, og hetta hevur eisini okkara áhuga. Ein háttur at savna hesi smádýrini er at leggja ein moldbøkk undir eina ljósperu. Bøkkurin tornar omanfrá, og dýrini leita longur niður og undir bøkkin hava vit lagt eina rist, sum dýrini detta ígjøgnum, og niður í eitt glas har tey verða fangað.

### GREINING

Sýnini, t.e. fallfellur og maðkasýni og so framvegis, vórðu greinað við sjóneyku, og øll djór bólkað í ein av 40 djórabólkum.



*Magnus Gaard leggur teimum lag á at greina plantur*



*Eva og Hans Meinhard greina dýrini*

### STROYMING AV DRUNNHVÍTA

Í 2019 varð eisini ein fyrsta roynd gjørd við beinleiðis stroyming. Í Koltri varð myndatól sett á reiðrið hjá einum drunnhvítapari. Hetta varð síðan stroymt á heimasíðu Tjóðsavnsins. Umframt at stroyma beinleiðis liggja hesir filmarnir tøkir á heimasíðuni. Teir eru yvir 2000 í tali.

Drunnhvítar eiga í og innanfyri veggirnar í gomlu gróthúsunum í Koltri. Her verpa teir um mánaðarskiftið juni-juli, og ikki fyrr enn seint í september er ungin floygdur.

Meira er at lesa á www.tjodsavnid.fo/drunnhvitin-i-bonhusinum



*Selma og Hans Meinhard hava sett fallfellur niður og tikið moldsýni*

# RINGMERKING OG FUGLA-KANNINGAR 2019

Nógv ringmerkingarvirksemi var í Føroyum í ár. 7 ringmerkjarar vóru virknir, og tilsamans ringmerktu teir 1616 fuglar. Afturboðanir komu um 212 ringmerktar fuglar

**Tekstur: Jón Aldará, lívfrøðingur**



*Grágásin HSS avmyndað saman við makanum í Sørvági. Mynd: Rodmund á Kelduni 2012*

*Yvirlit:*

| Slag | Merktir | Fráboðanir |
|---|---|---|
| Drunnhvíti | 1405 | 136 |
| Sýldur drunnhvíti | 49 | 16 |
| Skrápur | 19 | 0 |
| Havhestur | 5 | 1 |
| Kjógvi | 33 | 19 |
| Skúgvur | 29 | 2 |
| Lundi | 20 | 4 |
| Lomvigi | 0 | 7 |
| Likka | 0 | 3 |
| Svartbakur | 2 | 0 |
| Rita | 8 | 0 |
| Tjaldur | 0 | 1 |
| Skarvur | 4 | 1 |
| Æða | 3 | 13 |
| Grágás | 0 | 1 |
| Svanur | 0 | 4 |
| Bládúgva | 39 | 1 |
| Kvørkveggja | 0 | 1 |
| Gráspurvur | 0 | 2 |
| Samanlagt | 1616 | 212 |

*Ein litringmerkt kjógvapisa við Fjallavatn, juli 2019*





*Svanurin ZJP avmyndaður í Vágum. Mynd: Jóhannus Hansen juli 2019*

**Nakrar sermerktar** ringmerkingarsøgur vóru í 2019. Grágásin við litringinum HSS, ið varð ringmerkt sum ungi í Orkneyoyggjunum í 2010 og seinni flutti til Føroya at reiðrast, endaði sínar dagar á Vága flogvølli, har hon varð skotin í sambandi við trygdarátøk. Serliga nógvar fráboðanir hava verið um hesa gás, bæði úr Føroyum og úr hennara vetrarøki í Bretlandi.

Somu lagnu fekk svanurin ZJP, ið varð sæddur vesturi í Vágum á sumri og á heysti og síðani skotin á flogvøllinum. Enn er onki svar komið um, hvaðani hesin fuglur er komin, men roknað verður við, at hann hevur uppruna í Bretlandi.

Eftir fiskiskap sunnanfyri Mykines vórðu leivdir av einum ringmerktum fugli funnar í maganum í einum toski. Fyrst varð hildið, at hetta var skrápur, men við nærri kanning vísti tað seg at vera ein kjógvi, ið varð ringmerktur sum vaksin fuglur í Mykinesi í 1999 av navnframa ringmerkjaranum Willy Mardal. Roknað verður við, at hesin fuglur gjørdist meira enn 22 ára gamal, og er hann tí elsti føroyski kjógvin, sum nakar veit um. Júst hvussu hann er endaður sum toskaføði er tó ein gáta.

## FUGLAVERKÆTLANIR

Tvær drunnhvítaverkætlanir vóru í 2019 og tilsamans vórðu ringmerktir 1405 drunnhvítar og 49 sýldir drunnhvítar, meðan ávikavist 136 og 16 vóru afturfingnir. Í Mykinesi varð Tjóðsavnið við í eini verkætlan hjá Anne M. A. Ausems, PhD-lesandi, ið snúði seg um at kanna m.a. fjaðurskifti og føði hjá drunnhvíta og sýldum drunnhvíta. Í Nólsoy stóð Jógvan Thomsen fyri verkætlanini, ið skuldi lýsa ávís lívsviðurskifti hjá drunnhvíta á oynni.

Aftur varð gjørt eftirlit við undankomu hjá kjógva í Fugloy, Svínoy, Saksun og Akrabyrgi. Kanningin vísti líknandi mynstur sum undanfarin ár. T.d. kemur enn lítið og onki undan í Fugloy, meðan tað gongur væl betri í Akrabyrgi. Eisini vórðu onnur kjógvabøli skrásett og tald, og framhaldandi litringmerkingin av kjógva- og skúgvapisum var sera væleydnað í ár.

Í sambandi við førleika- og samstarvsmenning gjørdi samskiparin av føroyska ringmerkingarbólkinum tveir ringmerkingartúrar til Danmarkar. Nógv virðismikið fekst burturúr, og millum annað varð byrjað uppá nýggja verkætlan um at litringmerkja svartbak í Føroyum í samstarvi við Ringmærkningscentralen í Danmark. Av tí at hetta kom í lag nakað seint á sumri, so eru bert fáir bakskurar merktir higartil.

Ein partur av arbeiðinum í sambandi við altjóða Ramsar-sáttmálan eru kanningar av lunda í Mykinesi og drunnhvíta í Nólsoy. Í 2019 varð ein roynd gjørd at telja drunnhvíta, tó hon gjørdist úrslitaleys. Arbeiði við at menna sjálva mannagongdina varð eisini gjørt. Í Mykinesi varð gjørd ein roynd fyri at meta um, hvussu nógv kom undan hjá lundanum, tó eisini her er ivasamt, hvussu væl eydnað teljingin var.



*Drunnhvíti í Mykineshólmi, august 2019*



*Sýldur drunnhvíti í Mykineshólmi, august 2019*



*Mynd, sum er ein av teimum 100 í stakkaðu myndini. Fokusøkið er mitt um eyguni.*



*Mynd, sum er fokusstakkað av 100 stakmyndum*





*Útgerðin til at taka myndir til fokusstakkan*

# Fokusstakkan í makromyndum

## Í savnshøpi er trupult at sýna smáar lutir fram, og tí ber til at avmynda lutin og harvið gera hann størri

**Tekstur: Jan Sørensen, savnsvørður**

**Til hetta endamál** hevur Tjóðsavnið útvegað sær góða fotoútgerð. Við hesi útgerð er tað gjørligt at avmynda ein lítlan lut og síðan gera stórar hágóðsku fotomyndir av lutinum. Eitt dømi um hetta var framsýningin "Stórt, men smátt".

Nærmynd av lutum verður vanliga kallað makro, og at taka nærmyndir verður nevnt makrofotografering. Øll, sum fáast við makrofotografering, fáa sama trupulleika. Tá luturin, sum skal avmyndast, kemur ov tætt at linsuni gerst klára økið so stutt, at tað mesta av myndini verður óklárt. Ein onnur avleiðing er eisini, at tað verður ringt at fáa nokk av ljósi. Tess minni luturin er, tess størri gerst trupulleikin, og hetta ger, at tað ber ikki til at avmynda smáar lutir uttan at brúka framkomna tøkni. Hendan tøknin eitur fokusstakkan ("focus stacking" á enskum) og er í stuttum at taka fleiri myndir av sama luti og síðan at seta tær saman í eina mynd, har alt er klárt.



*Tekningin vísir fimm myndir við ymiskum fokuspunktum, sum aftaná viðgerð í serligum forriti framleiðir eina mynd, har alt er í fokus*

### MANNAGONDIN ER Í STUTTUM

- At seta upp tað, sum skal avmyndast
- Stilla útgerðina til at taka fremstu myndina (tað sum er tættast fototólinum)
- Stilla útgerðina til seinastu myndina (longst frá fototólinum)
- Avgera, hvussu nógvar stakmyndir skulu takast
- Um strekkið frá fremsta punkti til aftasta punkt er 10 mm, og tølið verður sett til at taka 10 stakmyndir, so verður 1 mm millum hvørja stakmynd
- Innstilla blendu, tíð og blits
- Seta í gongd – stakkaratólið er sjálvvirkið og tekur myndirnar sjálvt
- Flyta stakmyndirnar í stakkaraforrit og gera lidnu samansettu myndina har
- Um neyðugt at viðgera stakkmyndina meira í Photoshop ella líknandi forriti
- So kann myndin prentast

# Høvuðsarbeiðsøkið hjá Bygningadeildini er tann bygningaligi mentanararvurin



*Tekjan á Hvalvíkar kirkju varð skift í 2019*

**Bygningadeildin** ger tilmæli til Fornminnisnevndina um friðing av bygningum og um økisfriðingar í hesum sambandi. Harumframt umsitur deildin ymisk loyvi í sambandi við friðaðar bygningar og leggur mál um hetta fyri Fornminnisnevndina um neyðugt. Deildin umsitur eisini stuðul til friðaðar bygningar.

Eisini viðger deildin mál um kirkjur, sum eru eldri enn 100 ár sambært anordning nr. 888 frá 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om folkekirkens kirkebygninger og kunngerð nr. 13 frá 11. februar 2000 um bygningar fólkakirkjunnar.

Harumframt umsitur deildin gomlu bygningarnar hjá savninum og viðger mál um tilsvarandi bygningar hjá bygdasøvnunum.

Í ymsum byggisamtykturn eru eisini serligar ásetingar um gamlar bygningar, og í hvønn mun savnið skal viðgera mál um hesar bygningar ella bygging nærhendis.

## FRIÐAÐIR BYGNINGAR OG KIRKJUR UMFRAMT KIRKJUR ELDRI ENN 100 ÁR

Við Faktorhúsini í Klaksvík er komin standmynd av listakvinnuni Elinborg Lützen. Í sambandi við ymisk arbeiði við friðaðum kirkjum og kirkjum eldri enn 100 ár hevur Bygningadeildin verið uppií, m.a. tá Nes kirkja í samstarvi við danska tjóðsavnið hevur fingið gjørt nýggj stoypijarnsvindeygu eftir teimum gomlu, tí hesi vóru so illa tærd. Harumframt hevur deildin vegleitt í sambandi við tekju og takvindeygu í Hvalvíkar kirkju og bygningsarbeiði á Mykinesar kirkju. Eisini hevur deildin verið við í ætlanunum um vesi við Sands- og Funnings kirkju umframt tikið lut í nøkrum av teimum próstasýnum, sum hava verið hetta árið. Saman við konservatorinum hevur deildin verið í Bíggjar kirkju í sambandi við lampettur og ljósastakar.

## BYGDARSØVN

Deildin hevur givið Sands bygdarsavni ráð um savnsgoymsluna, og bygdasavninum í Nes Kommunu ráð viðvíkjandi Prestagarðin á Nesi, herundir endurskapan av Prestakamarinum. Vitjað var eisini í Gamlagerði, í húsinunum á Gadd og í Køkshúsunum. Gøtu fornminnissavn hevur fingið ráðgeving um umvælingar av Blásastovu.

## FØROYA FORNGRIPAFELAG

Bygningadeildin hevur vitjað húsini hjá Føroya Forngripafelag á Jógvansbreyt í Húsavík, har umvælingar eru framdar. Umvælingarnar vóru partvís fíggjaðar við stuðli frá Tjóðsavninum. Eisini varð hugt at myllunum í Dali og á Skarvanesi.

## OGNIR HJÁ SAVNINUM

Í sambandi við umvælingar av húsunum uttan Ánna í Sandvík, er tilfar til klædning komið úr Noregi, eins og nøkur gomul vindeygu eru umvæld og nýggj gjørd eftir hesum, har tey gomlu vóru burtur. Í húsunum í Koytu á Sandi er fylt uppaftur, har grivið hevur verið undir glassstovugólvinum og nýggj undirsløg løgd.

Umvælingar vórðu gjørdar í Dúvugørðum í Saksun, m.a. av vindeygum, tekju og skjøldrum og úthurðini til haldhúspartin. Harumframt blivu hurðar til vesini til vitjandi umvæld, og ankar í hoyggjhúsið gjørt av nýggjum.

Ein heildarætlan fyri Koltur er í gongd, har savnsarkitekturin tekur lut – hesa verkætlan verður nærri kunnað um í næsta ársriti.

## SKEIÐ O.T.

Savnsarkitekturin luttók á restaureringsseminar hjá danska Slots- og Kulturstyrelsen í Århus saman við 3 øðrum føroyskum arkitektum frá ávíkavíst SNA arkitektar, MAP-arkitektum og FuglArk. Í sambandi við vitjanina í Århus varð eisini nýtt høvi at vitja framsýningina í miðbýnum av útgrevstri frá víkingatíð. Í Den Gamle By varð vitjað á eini framsýning um installatiónir o.a. í íbúðarhúsum gjøgnum tíðirnar.

Savnsarkitekurin luttók eisini á framløgu í Norðurlandahúsinum í februar av menningarætlan fyri ferðavinnuna og í apríl á seminari um lendisplanlegging, sum Fróðskaparsetur Føroya hevði bjóðað til.



*Tjóðsavnið læt gera fitt av umvælingum á Dúvugarðar várið 2019*





# FORNMINNIS-NEVNDIN

**Fornminnisnevndin** virkar sambært løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 19. apríl 1972.

Landsstýrið (Mentamálaráðið) setur Fornminnisnevndina við 3 limum, sum eru stjórin fyri Føroya Forngripasavn (seinni Føroya Fornminnissavn og Tjóðsavnið), ein løgfrøðingur og ein bygningakønur. Í 2019 vóru limirnir í Fornminnisnevndini, Herleif Hammer, Julianna Klett og Johan Laksáfoss.

Tjóðsavnið er avgreiðsla hjá Fornminnisnevndini.

Nevndin hevur m.a. til uppgávu at gera tilmæli til Landsstýrið um, hvat kemur undir ásetingar um jarðføst fornminni, hvørjir bygningar eiga at friðast og at viðgera ymisk mál í hesum sambandi.

Í 2019 hevði nevndin 5 fundir. Nevndin hevði 1 ástaðarfund og 2 fundir við Tórshavnar kommunu.



*Innanfyri Skinnarasker er gamalt fiskastykki. Eitt av málunum, ið nevndin viðgjørdi í 2019, var umsókn frá Bátafelagnum um at gera drátt og at leggja terassufjalar á partar av fiskastykkinum*

# ROYNDARUMVÆLING AV LAÐAÐU MÚRUNUM Á SKANSANUM



*Umvælingin er byrjað og flagið tikið av. Tað sæst týðiliga, at múrurin er illa farin og sera gloprutur*



*Múrurin er laðaður umaftur, og farið er í gongd við at fylla mørtil í laðingina*

**Á Stangarnesi í Havn** hevur skansi staðið síðani seinnu helvt av 16. øld. Skansin fekk sítt núverandi skap í sambandi við stóru umvælingina og nútímansgerðina, sum Christian K.U. von Born kommandantur læt gera. Born var kommandantur á Skansanum í tíðarskeiðinum 1882-1896.

Múrarnir á skansanum eru sosatt uml. 250 ára gamlir, og krevja teir í dag stórar ábøtur. Seinastu 100 árini hava farið illa við múrinum. Hetta er ikki so løgið, tá hugsað verður um, at havnarútbygging við spreingingum og tungari ferðslu hevur verið kring Skansan seinastu 100 árini.

Tjóðsavnið gjørdi í 2019 eina royndarumvæling av múrinum inni í garðinum aftanfyri skansahúsini. Hetta varð gjørt fyri at kanna, hvussu støðan var inni í múrinum og fyri at fáa royndir í, hvussu best var at gera umvælingarnar.



*3D skráseting varð gjørd av múrinum áðrenn royndarumvælingina*



Tekstur: Súsanna Joensen, konservator

# KONSERVERING AV ALTARTALVUM

**Ímillum mongu** uppgávurnar á Tjóðsavninum er ráðgeving og hjálp til bygdarsøvn, kirkjur v.m. Tá kann talan vera um konservering (umvæling/ístandseting) av innbúgvi, ið er gamalt og skal handfarast av serkønum fólkum.

Ikki alt ber til at gera her í landinum, og tað er serliga til at konservera málningar, tvs. altartalvur, at serkøn fólk ikki finnast í Føroyum. Í ár vórðu 5 altartalvur sendar av landinum úr hesum kirkjum: Sørvágs, Oyndarfjarðar, Norðskála, Kunoyar og gomlu Nes kirkju.

Fyrst vórðu altartalvurnar kannaðar á staðnum av Søren Bernsted, chefkonservatori á Kunstkonserveringen Øst, og tilboð varð fingið upp á arbeiðið, sum kirkjuráðini tóku við. So kundu altartalvurnar takast niður, pakkast í sergjørdar flutningskassar og sendast í bili fyri seg til Kunstkonserveringen Øst. Bilurin fór til Danmarkar ólavsøkumorgun. Avtalað varð, at altartalvurnar skuldu vera aftur í kirkjunum til nýggja kirkjuárið 1. desember 2019.

Í november komu tær so aftur – ikki sum nýggjar, men styrktar til komandi tíðir.

Fólk á staðnum hava tikið væl ímóti og hjálpt konservatorunum úr Danmark og okkum á Tjóðsavninum í hesum arbeiði. Eisini Føroya Stiftstjórn og Dómprósturin hava sýnt hjálp og vælvild.



*Altartalvan í Sørvági verður tikin niður*



*Altartalvan í Kunoyar kirkju verður hongd uppaftur*

# SKÚLATÆNASTAN Á TJÓÐSAVNINUM



Tórarinn N. á Rípuni greiðir næmingum frá um dímunarseyðin



Palli Askham t.v. og Tórarinn N. á Rípuni eru savnslærarar á Tjóðsavninum

Tekstur: Vónbjørt Tróndheim

**Skúlatænastan hjá Tjóðsavninum,** sum Palli Askham, savnslærari og KT-vørður, og Tórarinn N. Niclasen á Rípuni, savnslærari, varða av, er tænasta, sum skúlar nú í fleiri ár hava havt gleði av. Hon gevur næmingunum høvi at koma út úr flokshølinum at fáa eitt kveikjandi innlit í føroyska søgu, mentan og náttúru – eitt upplivilsi, ið er heilt øðrvísi, tá ein sleppur at síggja, lukta og nerta við ymiskt, sum Tjóðsavnið sýnir fram.

Í erva er framsýning av jarðfrøði, vegetatiónssøgu, fuglum, fiskum og landnámi. Harafturat er ein framsýning av siglingarsøguni á balkongini, sum byrjar við slupptíðini. Í neðra er framsýning av fornfrøði og fólkalívsfrøði, umframt bátasýning við bátum og amboðum til bátasmíð.

Skúlatænastan er ókeypis, og neyðugt er bert at siga frá við at ringja ella skriva til savnslærararnar nakrar dagar áðrenn. Savnslærararnir syrgja fyri at hava savnið opið, tá næmingarnir koma, og kunnu eisini hava eina gjøgnumgongd av savninum. Til ber eisini at biðja um at fáa rundvísing og frágreiðing um ávísar partar av savninum. Harumframt ber til hjá næmingum at arbeiða við uppgávum, sum savnslærararnir eftir umbøn kunnu gera til framsýningina. Ein annar háttur at fáa rundvísing uppá, er at næmingarnir samlast í skúlastovuni til felags upplegg; síðani heldur framsýningin fram runt á savninum. Lærarar hava eisini møguleika at koma við flokkum og hava sína egnu gjøgnumgongd á savninum.

Savnið er áhugavert, og royndir vísa, at næmingar, sum vitja savnið, ofta eru bilsnir av øllum tí, sum er at síggja á savninum, og Tjóðsavnið merkir hetta í einum vaksandi áhuga fyri framsýningunum.

## HVØR KANN BRÚKA SKÚLATÆNASTUNA?

Barnagarðar, fólkaskúlar, miðnámsskúlar og hægri útbúgvingarskúlar brúka skúlatænastuna á hvørjum ári. Í miðal brúka umleið 1000 næmingar skúlatænastuna um árið. Umframt føroysk børn og næmingar, brúka útlendskir skúlar eisini savnið nógv. Annars er nógv tann størsti parturin av næmingunum úr høvuðsstaðarøkinum, hóast hetta er tænasta til næmingar úr øllum Føroyum.

## HVUSSU STÓRIR KUNNU BÓLKARNIR VERA?

Bólkarnir, sum vitja Tjóðsavnið, kunnu vera alt frá heilt smáum bólkum og upp til eini 20 – tó ber til at hava størri bólkar, nú Tjóðsavnið hevur tveir savnslærarar, sum í felag taka sær av skúlatænastuni. Í framsýningini í Hoyvíksgarði er tó ikki rúm fyri meiri enn okkurt um 10-15 í senn.

## HVUSSU BÍLEGGUR MANN?

Við at skriva til: savn@savn.fo, torarinnr@savn.fo, pallia@savn.fo

Ella ringja á tel. 790554 ella 790573

Tá tú bíleggur, skalt tú bíleggja í seinasta lagi ein dag áðrenn ætlaðu vitjanina. Harumframt upplýsir tú tal á næmingum, ynski um, hvat slag av rundvísing, tit vilja hava, aldur á næmingunum og hvaðani næmingarnir eru.





# Tit vunnu eina rannsóknarferð út í Tindhólm

Tekstur: Lis Mortensen, náttúrulandafrøðingur | Jarðfeingi

**Smá børn, stór børn,** foreldur, fleiri ommur og nakrir abbar vóru við í stóra ferðalagnum, tá Jarðfeingi skipaði fyri eini rannsóknarferð út í Tindhólm tann 22. juni í 2019. Børnini høvdu vunnið hesa ferðina til familjur sínar, tá tey luttóku á Savnsfagnaðinum á Tjóðsavninum í heystfrítíðini oktober 2018.

Tey vistu, at útferðin við vísindafólkum frá Jarðfeingi at síggja grótsløg og kanska eina gamla vulkan í Tindhólmi, mátti bíða til veturin var av, og ein góður dagur kom út í móti sumri 2019. Nú vóru tó fleiri av børnunum farin at ótolnast.

Glað vóru øll, tá tey ringdu frá Jarðfeingi. Barbara á Biskopstø Hansen, Gunnleyg Ihlen og Lis Mortensen spurdu: "Eru tit klár? Veðrið er gott, báturin er klárur, og vit fara avstað leygardagin. Tað er longu í morginári..." Øll blakaðu alt, sum tey høvdu í hondini og vóru klár. Saman við ferðaleiðaranum Sigurd Nordendal gjørdust vit 42 fólk, sum fóru við leigubátinum og djørv lupu í land á lítlu lendingini við Tindhólm.

Útferðin var skipað sum ein rannsóknarferð, har børnini og øll tey ungu, sum høvdu hug at luttaka, fingu hvør sína feltdagbók og blýant. Uppgávan var at ganga ein túr runt allan Tindhólm við bókini, har tú kundi undrast og seta spurningar um tað, sum tú sást á túrinum. Spurningarnir skuldu so noterast í dagbókina sum tekstur, tekningar og sjálvvaldar krussedullur. Mamma ella abbi kundu gott hjálpa til.

Hvør fuglur er hatta, hvørji eyðkenni hevur hann? Hvat tari er hetta, og er hann sjáldsamur ella vanligur? Hvønn diametur hava tær hvítu skónirnar í fjøruni og hvønn diametur hava tær uppi undir homrunum? Hvørji sløg av skón eru mest vanlig her, sum eg standi? Hvørji sløg av gróti finni eg her í fjøruni, og hvørji sløg av mineralum eru her? Hava summarhúsini á Tindhólmi eina vatnkeldu, og hvussu nógv vatn rennur í henni? Nógv spennandi kjak var um spurningar allan dagin. Vit endaðu ferðina við lekrum drekkamunni og heimsins bestu kaku, meðan nøkur børn um 7 til 12 ára aldur løgdu fram allar teir spennandi spurningarnar, sum tey høvdu funnið í Tindhólmi.

Hetta gjørdist ein sólríkur og serstakliga hugtakandi og læruríkur dagur hjá okkum øllum.







Sølubúðin juni 2020

# FORKUNNIG SØLUBÚÐ

## Úrvalið í sølubúð Tjóðsavnsins er sera fjølbroytt við bókum, brúkslutum, spølum, minnislutum og gávulutum

**Savnið hevur seinnu árini** lagt seg eftir at framleiða sølulutir til sølubúðina, ið eru serstakir, og sum bert kunnu keypast í sølubúð Tjóðsavnsins. Umráðandi er, at sølubúðin onkursvegna umboðar virksemi okkara – tað, vit hava í goymslunum og í framsýningunum. Tá Tjóðsavnið bæði er eitt fornminnissavn og eitt náttúrugripasavn, er av stórum týdningi, at bæði økini síggjast aftur í sølubúðini.



Hesi fittu djórini eru eisini floytur







Føroysk bindingarmynstur eru góð motiv á ymiskum vørum



Tyssibørkutari, Jóansøkugøtubrá og rukkut reyðblað. Tekningar Astrid Andreasen



Dímunarseyður teknaður á T-blusu

Sum dømi uppá lutir, sum savnið hevur fingið framleitt, kunnu nevnast tekningar hjá Astrid Andreasen av tveimum tarasløgum og av jóansøkugøtubrá, magnetir við ymiskum bindingarmynstrum og føroyskum djórum, endurskin við føroyskum myndevnum, ymisk djór evnað úr leiri, T-blusur og jólakúlur við bindingarmynstrinum "dansiringurin".

# MIÐLAN 2019

11.02.19 **Erland V. Joensen.** Pensiónistaskeið á Føroya Fólkaháskúla.
Hvalastøðin og framtíðin.

22.02.19 **Erland V. Joensen.** Pensiónistaskeið á Føroya Fólkaháskúla.
Hvalastøðin og framtíðin.

18. 03.19 **Helgi D. Michelsen.** Fyrilestur Fornminnisfelagið Heima á Sandi.
"Fornfrøðiligu kanningarnar á Sandi sumrini 2017-2018".

28.03.19 **Erland V. Joensen.** Framløga í Fornminnafelagnum fyri Skála og Skálabotn.
"Tann nýggja tíðin – tá ið søgan er skitin og slitin".

10.04.19 **Erland V. Joensen.** Framløga fyri bygdarfólkunum í Kvívík.
"Tann nýggja tíðin – tá ið søgan er skitin og slitin".

25.05.19 **Jan Sørensen.** Almenn framløga í Krambúðini í Vestmanna um arbeiðið við myndatøkuni til framsýningina "Smátt men stórt".

22.06.19 **Jan Sørensen.** Almenn framløga á Varðanum Pelagic á Tvøroyri um arbeiðið við myndatøkuni til framsýningina "Smátt men stórt".

01.07.19 **Helgi D. Michelsen, Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús og Hákun Andreasen** bjóðaðu almenninginum oman á útgrevsturin á Velbastað allan mánaðin, har tey greiddu frá arbeiðinum.

24.08.19 **Símun V. Arge.** Seinsummardagur á Sandi. Framløga.
"Fornfrøðiligar rannsóknir á Sandi í 50 ár".

20.09.19 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús.** Vísindavøka. Fyrilestur um víkingagravir í Føroyum.

20.09.19 **Magnus Gaard.** Vísindavøka. Fyrilestur um fleirlitni (polyploidy) í føroyskum plantum.

06.11.19 **Símun V. Arge.** Undirvísing í sambandi við ferðaleiðaraskeið. Miðnám í Vestmanna.

26.11.19 **Símun V. Arge.** Luttøka á verkstovu um bygdaatlas í Kvívíkar kommunu.



*Vísindavøkan hevur seinastu árini hildið til í siloini á gomlu saltsøluni í Havn*

## ÚTGÁVUR

**Jón Aldará og Jens Kjeld Jensen.** Gongdin hjá æðu, teista og heiðafugli í Nólsoy. Frøði nr. 2/2019.

**Símun V. Arge.** Margaryan, A, et al. : Population genomics of the Viking world. bioRxiv. The preprint server for biology.

**Símun V. Arge.** Aspects of Hanse archaeology in the Faroe Islands. Í: Mehler, N., M. Gardiner og E. Elvestad (Ritsj.). W. Bruun og L. Prøsch-Danielsen (Stuðulsritstjórn) German Trade in the North Atlantic c. 1400-1700. Interdisciplinary Perspectives. AmS-Skrifter 27, 277–289, Arkeologisk Museum. University of Stavanger, pp. 277-289.



# TJÓÐSAVNIÐ Í MIÐLUNUM 2019

23.01.19 **Sosialurin.** Bjørn Patursson um náttúrukanningar í Koltri
06.02.19 **Kvf/greinar.** Janus Hansen um grágásateljingar
14.02.19 **Góðan Morgun Føroyar.** Magnus Gaard um veðurlagsbroytingar
12.03.19 **Nón.** Janus Hansen um Tjaldrið
12.03.19 **Nón.** Magnus Gaard um várið
13.03.19 **Nón.** Tórarinn N. á Rípuni og Jón Aldará saman við Silju Aldudóttir frá Bókadeild Føroya Lærarafelags um tiltakið Darwin og klukkurnar
22.03.19 **Dagur og Vika.** Bjarni Mikkelsen, deyður hvalur á land
28.03.19 **Dagur og Vika.** Herleif Hammer um Hoydalar
12.04.19 **Góðan morgun Føroyar.** Rannvá Winkler og Tórarinn N. á Rípuni um serframsýning um Merkið
15.04.19 **Dagur og Vika.** Tórarinn N. á Rípuni um flaggframsýningina
19.04.19 **KVF.** Símun V. Arge: Fólk var í Føroyum í 4. øld. Endursending frá 2016
24.04.19 **Góðan morgun Føroyar.** Tórarinn N. á Rípuni um flaggsøguna
06.05.19 **Dagur og Vika.** Magnus Gaard um hvussu plantulívið er hótt
07.05.19 **Dagur og Vika.** Magnus Gaard um politiska raðfesting av náttúruni í Føroyum
09.05.19 **Dagur og Vika.** Erland Viberg Joensen um hvalastøðina við Áir
16.05.19 **Dagur og Vika.** Herleif Hammer um Ergisdal og orkuútbyggingar
25.05.19 **Góðan Morgun Føroyar.** Jan Sørensen um framsýningina "Smátt – men stórt"
18.06.19 **Dagur og Vika.** Helgi D. Michelsen um grevsturin á Velbastað
28.06.19 **Dagur og Vika.** Símun V. Arge um varðveitingararbeiðið á múrin í Kirkjubø
01.07.19 **Kvf/greinar.** Símun V. Arge um varðveitingararbeiðið á Kirkjubømúrin
03.07.19 **Dimmalætting.** Jan Sørensen um ferðaframsýningina "Smátt men stórt"
05.07.19 **Dagur og Vika.** Erland Viberg Joensen um hvalastøðina við Áir, sum letur upp í summar: Hvalastøðin sigur ídnaðarsøgu
08.07.19 **Summarmorgun.** Erland Viberg Joensen og onnur um verkætlanina at varðveita hvalastøðina við Áir
08.07.19 **Sosialurin.** Símun V. Arge: "Skilur ikki kritikkin". Viðmerkingar til Anniku Olsen, borgarstjóra
13.07.19 **Vága Útvarp.** Janus Hansen um Føroya náttúru
17.07.19 **Kvf.** Helgi D. Michelsen um at brenna bál
27.07.19 **Kvf Morgunsendingin.** Janus Hansen um likkuna
30.07.19 **Kvf/greinar.** Um arbeiðið við bakkaverjum
24.08.19 **Frítíð og náttúra.** Jón Aldará um lundateljing í Mykinesi
01.09.19 **Scan Magazine.** Issue 128. Grein um Tjóðsavnið
05.09.19 **Sosialurin.** Magnus Gaard um plantur har seyður ikki sleppur til
07.09.19 **Kvf.** Erland V. Joensen um virksemið á hvalastøðini við Áir
07.09.19 **Frítíð og náttúra.** Jón Aldará um støðuna hjá kjógva
09.09.19 **Dagur og Vika.** Símun V. Arge um varðveitingararbeiðið á Kirkjubømúrin
10.09.19 **Kvf/greinar.** Símun V. Arge um varðveitingararbeiðið á Kirkjubømúrin
16.09.19 **Barnaútvarpið.** Bjarni Mikkelsen um grind
17.09.19 **Barnaútvarpið.** Bjarni Mikkelsen um grind
18.09.19 **Barnaútvarpið.** Herleif Hammer um grind
20.09.19 **Kvf.fo/netvarp.** Vísindavøka. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús fyrilestur um víkingagravir í Føroyum
20.09.19 **Kvf.fo/netvarp.** Vísindavøka. Magnus Gaard fyrilestur um fleirlitni (polyploidy) í føroyskum plantum
14.10.19 **Góðan morgun Føroyar.** Tórarinn N. á Rípuni og Palli Askham um savnsfagnaðin 2019
17.10.19 **Dagur og Vika.** Símun V. Arge um bakkaverju í Nesi í Hvalba

# ICMM-RÁÐSTEVNA 2019



Museumsskipið Pommern er stoltleikin hjá Ålands Sjöfartsmuseum

**Erland Viberg Joensen** tók lut á nevndu ráðstevnu hjá 'International Congress of Maritime Museums' í Stokkhólmi og Mariehamn í Álandi, 15.-20. september 2019.

Eftir áheitan frá ICMM varð verkætlanin um hvalastøðina við Áir løgd fram mánadagin tann 16. september á Vasa Museet: *Industrial Maritime Heritage – A Faroese Whaling Station of Norwegian Origin – From Ruin to Exhibition*.

Tjóðsavnið tók fyri fyrstu ferð lut á ráðstevnu hjá ICMM. Ráðstevnan var væl fyriskipað. Nógv sambond vórðu knýtt við bæði søvn og savnsfólk.

Tjóðsavnið fer at søkja um limaskap í ICMM.



Erland Viberg Joensen greiðir frá verkætlanini á hvalastøðini við Áir



Norðuri í Gerði í Koltri. Erland V. Joensen greiðir frá

# Norðurlendski ríkisantikvar-fundurin 2019



Gestirnir vitja í stovuni á kongsgarðinum í Kirkjubø

**Norðurlendski ríkisantikvar-fundurin varð hildin á Hotel Hafnia í Havn dagarnar 21.-22. august. Øll norðurlondini vóru umboðað uttan Grønland. Tilsamans luttóku 16 fólk á fundinum – fimm frá Tjóðsavninum, eitt frá Mentamálaráðnum og tíggju úr norðanlondum.**

Høvuðsevnið á fundinum var "mentanarlandsløg". Rætt var um, hvussu vit kunnu varðveita tey, men samstundis miðla tey til almenningin. Hetta er ein avbjóðing, ið gongur aftur í flestu norðurlondum. Símun V. Arge hevði eina framløgu um mentanarlandsløg í Føroyum sum heild, meðan Herleif Hammer greiddi frá ætlanum savnsins úti í Koltri.

Í sambandi við fundin var ein gongutúrur fyriskipaður í Tinganesi og Reyni og ein útferð út í Koltur. Fundurin endaði við vitjan og døgurða á kongsgarðinum í Kirkjubø.



Bjørn Patursson greiðir frá royndunum at dyrka korn úti í Koltri





# Norðurlendskur savnsstjórafundur



Hundasletur, Ilulissat

**Norðurlendski savnsstjórafundurin í 2019 var dagarnar 5. – 8. august hildin í norðurgrønlendska býnum Ilulissat og bygdini Ilimanag, ið liggur nakað sunnanfyri Ilulissat.**

Vertir vóru Daniel Thorleifsen, stjóri, og Kristine Eiby Møller, Ph.D lesandi á grønlendska tjóðsavninum. Øll norðurlondini vóru umboðað á fundinum. Í Ilulissat var fundast á Hotel Artic og í Ilimanaq var fundast í tí gamla úthandlinum hjá tí Kongaliga Grønlendska Handlinum. Úthandilin og forvaltarahúsini vóru fyri fáum árum síðani afturførd til upprunan við stuðli frá m.a. Realdania.

Høvuðsevnið á fundinum var immateriellur mentanararvur. Rætt var um, hvussu ymisku londini arbeiddu við hesum evni. Sera nógv fokus hevur verið á hesum evni í Evropa seinastu árini. Soleiðis hevur eisini verið í Føroyum t.d. tá tosað verður um at varðveita føroyskt bátasmíð og føroyska dansin.



Í víkini norðanfyri bygdina Ilimanag eru 16 smáttur bygdar til ferðafólk at gista í

Í sambandi við fundin varð vitjað á býarsavninum í Ilulissat og við Ísafjørðin, sum stendur á listanum hjá UNESCO yvir náttúruheimsarv.



Kirkjugarðarnir í Grønlandi eru heilt serligir



Luttakararnir á fundinum á helluni við Ísafjørðin



# VISTFRØÐIS-RÁÐSTEVNA Í SALT LAKE CITY



Janus Hansen frammanfyri veggjarmyndini við føroysku úrslitunum

**Janus Hansen** luttók á ráðstevnu í Salt Lake City 19. til 23. mai 2019. Hetta var vistfrøðisráðstevna, ið altjóða felagið Society for Freshwater Science skipar fyri á hvørjum ári. Hesa ferð var tað við heitinum Translational Ecology in Freshwater Science.

Janus legði úrslit fram um sína gransking av ormverum hjá mýggjabitum í tveimum áum inni á Sundi á Streymoynni. Henda gransking er gjørd í samstarvi við Agnes-Katharina Kreiling (Háskólinn á Hólum) og Gísla Már Gíslason (Háskóli Íslands).



Stór framsýning var við ymisku granskingarúrslitunum

## KUNNINGAR-FUNDUR HJÁ ODM 2019



Tríggir av føroysku luttakarunum f.v. Tórarinn N. á Rípuni, Rannvá Winkler og Súsanna Joensen

**Organisationen** Danske Museer skipaði í november 2019 fyri kunningarfundi á Munkebjerg Hotel í Vejle í Danmark.

Endamálið við fundinum er, at fólk úr ymiskum fakbólkum á søvnum hittast og fáa fakliga sparring og felags referansur til arbeiðið, sum verður gjørt í savnsheiminum. Hetta gevur ein góðan møguleika at leggja fram og kjakast um fakligt viðurskifti. Seinastu árini hevur fundurin verið á Munkebjerg Hotel við fakbólkum úr: Forsøguligari fornfrøði, miðaldar/søguligari fornfrøði, mentanarsøgu í nýggjari tíð, konservering, framsýning, náttúrusøguliga fakbólkinum og list fakbólkinum. Partur av fundinum var eisini marknaðarføring av vørum, sum hava týdning fyri savnsheimin.

Tey luttakandi úr Føroyum vóru Rannvá Winkler (framsýning), Súsanna Joensen (konservering), Tórarinn N. á Rípuni (framsýning) og Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús (miðaldarfornfrøði).



Mynd úr salinum á Hotel Munkebjerg Vejle




Skrá

# ODM's formidlings-seminar 2019

**Savnslærararnir Tórarinn N. á Rípuni og Palli Askham vóru á formidlingsseminar í Fredericia 4. og 5. mars 2019. Heitið á seminarinum var Markleysa savnið.**

Í høvuðsheitum snúði seminarið seg um, hvussu vit miðla søvn í dag. Fleiri hildu, at søvnini skulu siga frá, hvørji vit eru, hvaðani vit koma, og kanska eisini hvagar vit fara. Tað síðsta er ikki so lætt, men vit sum søvn eiga at gera eina roynd at lýsa, hvar vit eru á veg.

Spurningurin um játtan og pengar fylti sera nógv. Tey donsku søvnini kappast móti hvørjum øðrum um gestirnar. Játtanin frá statinum minkar á hvørjum ári, og tí er neyðugt við støðugt fleiri gestum. Av hesum kom so eisini kjakið um, hvussu søvn eiga at vera. Millum annað helt Jakob Seerup frá Bornholms Museum, at søvnini í dag tordu alt ov illa at vísa fram vanligar lutir, ið tey liggja inni við, tí hetta halda gestirnir vera ov lítið áhugavert. Hann hevði ta roynd, at hjá teimum var tað als ikki galdandi; gestirnir streymaðu inn á savnið, tí at har høvdu tey nakað upp á hjartað. Um søgan um lutirnar er góð, so koma gestirnir eisini.

Hinvegin, so helt onkur, at tað fór ikki at ganga long tíð til vit síggja tað fyrsta savnið við als ongum lutum, har bert søga og uppliving er til staðar.

Tann seinni dagurin var um børn og ung á savninum. Hvussu kunnu vit arbeiða við miðlan til hendan málbólkin? Tosað varð um, hvussu mann kann betra ella broyta mátan, mann miðlar savnið. Til dømis hevði onkur gjørt upplegg til barnagarðar og skúlar til avís evni. Í dag er tað oftast so, at skúlar og barnagarðar koma, tí tey vilja okkurt. Men tað øvugta er væl eisini hugsandi; at søvnini gera upplegg og uppgávur til skúlar og barnagarðar og bjóða teimum inn at arbeiða við tí.

Seminarið endaði við tveimum sera skemtiligum innsløgum, men undir øllum skemtinum lá tó undirtónin av, hvussu týdningarmikil søvnini eru og koma at verða í eini framtíð, har sera nógv vitan er sera grunn.

## Altjóða og millumtjóða ráðstevnur og fundir Tjóðsavnið luttók á í 2019

| | |
|---|---|
| 25.-26.02.19 | **ICOM-nevndarfundur.** Lemvig, Danmark. Erland V. Joensen |
| 01.-03.03.19 | **Verkstova á Helsinki Universiteti.** Finnland. Símun V. Arge |
| 24.-28.04.19 | **"Expanding Horizons – Settlement in the Landscape in the North".** Verkstova í Íslandi. Símun V. Arge |
| 04.-05.03.19 | **ODM-miðlanarráðstevna.** Vejle, Danmark. Palli Askham og Tórarinn N. á Rípuni |
| 23.-29.03.19 | **VistÍsl-ráðstevna.** Hólar, Ísland. Magnus Gaard og Janus Hansen |
| 19.-23.05.19 | **SFS (Society for Freshwater Science).** Salt Lake City, USA. Janus Hansen |
| 05.-08.08.19 | **Norðurlendskur savnsstjórafundur.** Ilulissat, Grønland. Herleif Hammer |
| 21.-22.08.19 | **Norðurlendskur ríkisantikvarfundur.** Tórshavn, Føroyar. Helgi D. Michelsen, Erland V. Joensen, Tórálvur Weihe, Símun Arge og Herleif Hammer |
| 08.-15.09.19 | **ITEX ráðstevna.** Parma, Italia. Magnus Gaard |
| 15.-20.09.19 | **The 19th International Congress of Maritime Museums** (ICMM). Stockholm og Marienhamn, Svøríki og Áland. Erland V. Joensen |
| 28.-29.10.19 | **Vitjan á hvaladeildini á Zoologisk Museum, Keypmannahavn.** Jan Sørensen |
| 31.10-01.11.19 | **Symposium í Keypmannahavn.** Analysis and Imaging Techniques. Jan Sørensen |
| 11.-13.11.19 | **Kunningarfundur ODM.** Vejle. Danmark |
| 18.-22.11.19 | **Workshop í Reykjavík.** LongTerm Benthos Monitoring network for detecting changes in the Arctic benthic Ecosystem. Jan Sørensen |
| 29.11.19 | **Arktisk dialogmøde** - Kongeriget Danmarks strategi for arktis 2020-2029, Tórshavn. Jan Sørensen |



Herluf Sørensen undirvísir í treystisvenjing

# Skeið: MRT® – sálarlig treystisvenjing

**Í januar mánaði vóru starvsfólk á skeiði í sálarligum treystleika hjá Herluf Sørensen, ráðgeva innan organisatiónssálarfrøði.**

Eitt av grundarløgunum undir skeiðunum er, at sálarligt treysti (robusthed á donskum) er ikki nakað, tú annaðhvørt hevur ella ikki hevur, men at tað er eitt evni, vit kunnu venja. Granskað hevur verið í sálarligum treysti í meira enn 50 ár, og sálarligt treysti snýr seg um, at vit koma styrkt burturúr avbjóðingum og truplum hendingum. Eisini varð sagt, at nógv arbeiðspláss í almenna geiranum eru merkt av eini røð av stórum organisatoriskum broytingum, har starvsfólk noyðast at laga seg til umstøðurnar og politiska viljan. Skeiðið varði í tríggjar dagar og luttakararnir vóru væl nøgdir við skeiðið.

## SKEIÐ Í NÝGGJUM GEORADARA Á TJÓÐSAVNINUM



Petur Hansen við georadaranum Heima á Sandi

**Tjóðsavnið** útvegaði sær í 2019 nýggjan georadara til fornfrøðiligar kanningar. Í hesum sambandi varð skeið hildið á Tjóðsavninum í brúki av georadara í fornfrøðiligum hópi frá 14. til 16. mai 2019.

Skeiðshaldari var Andreas Viberg, p.hd. í fornfrøði, ið arbeiðir fyri fyritøkuna Guideline Geo í Svøríki. Luttakarar vóru Helgi D. Michelsen og Hákun Andreasen frá Tjóðsavninum og Petur Hansen fornfrøðilesandi.

Undirvísingin var deild upp í tríggjar partar. Fyrst var ein teoretisk gjøgnumgongd og upplæring í montering av ymsu deilunum í útgerðini. Síðan varð farið til Sands, har luttakararnir fingu frálæru í at gera fornfrøðiligt feltarbeiði við Georadaranum. At enda var eftirviðgerð av innsavnaðu dátunum við forritinum Reflex 2D/3D.

Hetta var eitt spennandi og væleydnað skeið, ið hevur havt við sær, at fornfrøðingar av Tjóðsavninum nú sjálvstøðugt og nær sum helst kunnu fara út um landið at gera fornfrøðiligar georadarkanningar.

Á sumri 2019 gjørdu fornfrøðingar á Tjóðsavninum saman við fornfrøðilesandi georadarkanningar av einum uml. 10.000 fermetra stórum øki norðanfyri kirkjuna á Sandi og í einum uml. 2.000 fermetra stórum øki niðri á Bakka á Velbastað.

### SKEIÐ Í VIRTUAL REALITY

**Palli Askham** savnslærari og KT-vørður luttók á skeiði í virtual reality, sum ODM skipaði fyri í september í Keypmannahavn. Evnið á skeiðinum var, hvussu virtual reality kann nýtast í savnshøpi. Undirvísari var Simon Lajboschitz, ið er íverksetari og hevur verið við til at stovna KT-fyritøkuna Khora.

## FRAMLØGA FYRI BORGARSTJÓRUM OG KOMMUNUSTJÓRUM



*Framløgan var á Parnassinum á Hotel Hafnia*

**22. februar** vóru umboð fyri Tjóðsavnið boðin at luttaka á árliga fundardegnum hjá landsins borgarstjórum og kommunustjórum, sum Kommunufelagið skipar fyri. Kommunurnar vóru væl umboðaðar á fundinum, sum var hildin á Parnassinum á Hotel Hafnia. Herleif Hammer, stjóri, og Helgi D. Michelsen, leiðari á fornfrøðideildini, høvdu framløgu við heitinum "Smidligari samstarv um jarðføst fornminni og mentanarminni". Framløgan snúði seg um, hvussu arbeitt verður í dag, tá fornfrøðiligar kanningar verða gjørdar. Serliga nógvur dentur varð lagdur á nýggjastu tøknina, sum Tjóðsavnið hevur tikið til sín, og sum ger kanningar og uppmátingar betri, bíligari og skjótari.

Boðskapurin til kommunurnar var í stuttum, at fornfrøðiligar kanningar eru nógv skjótari at gera í dag enn fyrr. Eisini var dentur lagdur á, at tað besta fyri allar partar er, at Tjóðsavnið er partur av øllum útbyggingarverkætlanum frá byrjan. Tilfarið, sum Tjóðsavnið framleiðir, tá kanningar verða gjørdar, kann harafturat verða til gagns og gleði fyri verandi og komandi borgarar í kommununum.





*Mads Bakken Thastrup, fornfrøðingur t.h. vísir runt í serframsýningini På vej mod katastrofen – Pompeji og Herkulanum*

# Á kunningarferð í Århus og Horsens 20.-22. november 2019

**Endamálið við ferðini var at menna sambond og samstørv við serfrøðingar innan fornfrøði og kunningartøkni á Moesgaard Museum í Århus og at síggja nýskapandi framsýningar á Moesgaard, Danmarks Industrimuseum og Fængslet í Horsens. Við á ferðini vóru Herleif Hammer, stjóri, og Helgi D. Michelsen, savnsvørður á Fornfrøðideildini.**

Á deildini fyri Náttúruvísindi á Moesgaard Museum hava tey serkunnleika í fornfrøðiligari plantufrøði (t.d. sáðgreining) í manna- og djórabeinum, í fornfrøðiligum høpi og í eyðmerking av øðrum fornfrøðiligum tilfari í moldini. Hetta er serkunnleiki og verkstovur, ið ikki eru á Tjóðsavninum. Tá fornfrøðiligar rannsóknir verða gjørdar í Føroyum er tað umráðandi, at rætta serfrøðin er við, og tí er umráðandi, at Tjóðsavnið hevur góð sambond við og samstarvar við søvn og lærdar háskúlar, ið hava hesar førleikar.

Tjóðsavnið samstarvar eitt nú við føroyingin Mads Taastrup Hansen, ið starvast á deildini fyri náttúruvísindi á Moesgaard Museum. Mads er fornfrøðingur við serkunnleika innan fornfrøðiliga plantugreining og greining av vulkanskum øskufláum (tefrakronologi). Mads hevur áður m.a. staðið fyri at finna hóskandi brend korn til kolevni-14 tíðarfestingar fyri Tjóðsavnið.

Á vitjanini á Moesgaard Museum fingu vit innlit í, hvussu nógv vitan um fortíðina kann fáast burtur úr moldini, tá øll fornfrøðilig serfrøði verður nýtt.

Á deildini fyri fornfrøðiliga kunningartøkni greiddu tey okkum frá, hvussu tey arbeiða við GIS- og 3D-forritum, dátugrunnum, forritan, 3D-animatión og øðrum til tess at geva granskarum og almenninginum betri innlit í og fatan av úrslitum frá fornfrøðiligum útgrevstrum.

Her hittu vit fornfrøðingarnar Peter Jensen og Casper Skaaning Andersen. Peter hevur ment framkomnan fornfrøðiligan dátugrunn í sambandi við ph.d. ritgerð sína, og Casper ger talgildar visualiseringar í sambandi við fornfrøðiligar rannsóknir.

Endamálið við vitjanini var at kanna, um fornfrøðiligi dátugrunnurin, ið Peter hevur ment, kann nýtast á Tjóðsavninum. Eisini var endamálið at skapa samstarv um fornfrøðiligar visualiseringar av leivdum, ið eru funnar í Føroyum.

Á ferðini vitjaðu vit eisini framsýningar á Moesgaard Museum og í Danmarks Industrimuseum og Fængslet í Horsens. Hetta eru stór og nýskapandi søvn, ið brúka nógv tøknilig amboð í miðlanini. Nógv verður gjørt burtur úr, so at tey vitjandi kunnu fáa eina serstaka uppliving.



*Casper Skaaning Andersen og Peter Jensen greiða frá á deildini fyri fornfrøðiliga kunningartøkni, Moesgaard Museum*

# Starvsfólkadagar oktober 2019



*Andras Sólstein, leiðari á Norðoya Fornminnasavni, greiðir frá*

**Aftur í 2019 høvdu starvsfólk Tjóðsavnsins starvsfólkadagar. Hesa ferð vóru teir hildnir á Viðareiði og Klaksvík tveir dagar seint í oktober mánaði. Karmurin kring tiltakið var Hotel Norð á Viðareiði. Skráin var sett saman av fyrilestri, bólkaarbeiði, gongutúrum og vitjanum.**

Fyrra dagin helt Kristian Eli Andersen, sálarfrøðingur, fyrilestur fyri starvsfólkunum. Fyrilesturin hevði heitið: "*Betra um arbeiðsgleði, slepp undan strongd, og avrika betur*". Eftir fyrilesturin var høvi at seta spurningar og gera viðmerkingar. Eftir døgurða var bólkaarbeiði. Evnini vóru ymisk hjá ymisku bólkunum, men felags evni fyri allar var ráðlegging framyvir. Eftir bólkaarbeiði varð farið ein gongutúr at vitja fornar búsetingar




*Í Posthúskjallaranum í Klaksvík stóð hetta serliga listaverkið hjá Edward Fuglø*

á Viðareiði saman við Daniel Lydersen, sum greiddi frá. Eisini varð vitjað í kirkjuni, har altarssilvurið varð tikið fram til høvið. Gongutúrurin endaði í prestagarðinum í Ónagerði, ið var um at vera liðugt umvældur.

Seinni dagurin byrjaði við, at bólkarnir stutt løgdu fram fyri hinum, hvat tey høvdu arbeitt við dagin fyri. Eftir hetta gekk leiðin suðureftir. Fyrst varð steðgað við Depilsgarð í Depli. Síðani tóku Andras Sólstein og Jógvan Andrias Joensen ímóti okkum í gamla kongaliga handilinum í Klaksvík. Andras vísti okkum runt og greiddi frá framtíðarætlanunum hjá Norðoya Fornminnasavni, meðan Jógvan Andreas greiddi okkum frá virkseminum í Spaniastovu. Vitjað varð eisini í Faktorhúsinum og við minnisvarðan yvir Elinborg Lützen.

Næst á skránni var ein vitjan í Christianskirkjuni. Í kirkjukjallaranum hanga 10 listaverk eftir Edward Fuglø. Sjúrður Sólstein kom at greiða okkum frá motivunum og smálutunum í listaverkunum. Væl lá fyri at greiða frá, tí tað var Sjúrður sjálvur, sum hevur tilevnað listaverkini, sum í stóran mun vóru sett saman av útskornum træi. Tíð varð eisini at síggja enn eitt listaverk eftir Edward Fuglø. Tað var ein eftirgjørdur grindahvalur í fullari støddd, sum var gjørdur úr túsundtals smáum leikuhermonnum. Hvalurin stóð í Posthúskjallaranum.

Dagurin endaði við vitjan í Nólsoyar Pálshúsi, har eitt av starvsfólkunum í "Fríða Kaffihús" vísti okkum runt og greiddi frá virkseminum og ætlanunum fyri húsið og økið við Biskupstøð.



*Tveir fornfrøðingar á Gamla Apotekinum. F.v. Rannvá Winkler og Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús*



*Lendingin í Eiðsvík á Viðareiði*

# VITJAN Á SØVNUM Í DANMARK OG NOREGI

## 28. januar til 1. februar 2019

**Ferðin varð sett saman soleiðis, at seks søvn í Danmark og Noregi skuldu vitjast. Fráferðin úr Føroyum var mánadagin tann 28. januar til Keypmannahavnar.**

Tann 29. januar varð farið til sjóvinnusavnið M/S Museet for Søfart í Helsingør. Endamálið var serliga at síggja serframsýningina *Når mænd får nok – af hinanden: Om bord med Danmark-ekspeditionen 1906-1908*. Framsýningin skal vísast á Tjóðsavninum í 2020. Hareftir fer hon til Íslands og Grønlands. Thorbjørn Thaarup, sum hevur havt ábyrgdina av framsýningini, greiddi frá. Hann vísti eisini ta føstu framsýningina, og stjórin Ulla Tofte var eisini við eina løtu. Hon nevndi samstarv um ein dátugrunn um norðurlendska sjóvinnusøgu.

Sama dag varð vitjað á Nationalmuseet í Keypmannahavn at síggja ta nógv umrøddu serframsýningina, *Mød Vikingerne*, sum sniðgevin Jim Lyngvild hevur evnað til saman við serfrøðingum. Framsýningin hevur elvt til mikið kjak millum serfrøðina og almenningin. Framsýningin var hábærsliga væl sett upp, men fekk okkum annars ikki upp frá.

Tann 30. januar varð vitjað á Vikingskipshuset hjá Kulturhistorisk Museum at síggja Gokstad-, Tune- og Osebergskipið, og á Norsk Folkemuseum, bæði á Bygdøy í Oslo. Víkingaskipini eru altíð hugtakandi eins og útisavnið á Norsk Folkemuseum. Somuleiðis sóu vit framsýningina í bygninginum við *Torget* um gerandislív og lívskor í Noregi frá 16. øld og fram til í dag, um norska fólkamentan, kirkjulist, tjóðbúnar o.a.m.

Tann 31. januar varð farið út á Domkirkeodden í Hamar – Hedmarksmuseet på Domkirkeodden, sum bæði er miðaldarsavn og útisavn, og í dag partur av Anno Museum i Hedmark. Dómkirkjan, sum er innilokað í glasi – *Glasskatedralen* ella *Hamardomen*, var merkisverd, og somuleiðis bispaborgin, sum er miðaldar- og mentanarsøgulig framsýning, sum kendi arkitekturin Sverre Fehn teknaði og innrættaði í 1973. Tað var serliga bispaborgin, sum var áhugaverd í sambandi við endurbygging og restaurering av býlinginum Norðuri í Gerði í Koltri, meðan verndarátøkini á dómkirkjutoftirnar vóru áhugaverd, tá hugsað verður um Kirkjubømúrin. Magne Rugsveen, deildarstjóri, greiddi frá og vísti runt.

Sama dag varð farið til savnið Eidsvoll 1814, har grundlógararbeiðið fór fram í 1814, og eftir 400 ára samríki við Danmark varð boðað frá, at Noreg var ein sjálvstøðug tjóð. Hesar søguligu hendingar fóru fram í tignarliga húsinum hjá ríkmanninum Carsten Anker, sum var stjóri á Eidsvoll Verk. Eidsvoll-bygningen varð settur í stand til 200 ára-haldið í 2014. Víst varð runt í húsinum við góðum leiðsøgufólki. Í nýggjum savnsbygningi var framsýning og miðlan av Noregi sum demokratiskt land í Demokratisenter for unge.

Farið varð aftur til Føroya 1. februar.

Við á ferðini vóru Herleif Hammer, Helgi D. Michelsen og Erland Viberg Joensen. Rannvá Winkler var við í Danmark.



*Mynd frá barnaøkinum í framsýningini hjá M/S Museet for Søfart. F.v. Thorbjørn Taarup, savnsvørður á M/S Museet for Søfart, Rannvá Winkler, savnsvørður, Herleif Hammer, stjóri, og Erland Viberg Joensen, savnsvørður*



*Bispaborgin í Hamar, har nýtt møtir gomlum. Myndin er av fyrilestrasalinum*



*Osebergskibet stendur í "vikingskipshuset", sum varð bygt at hýsa fleiri víkingaskipum. Serligi bygningurin, ið varð bygdur í 20- og 30 árunum, hevur skap sum ein krossur*





*Hamardomen er innilokaður í einum glashúsi og sostatt vardur móti veðri og vindi*

# VITJANARTØL TIL FRAMSÝNINGARNAR 2019

## Vitjandi – mentan og náttúra




**Í 2019 vitjaðu 16.036 fólk framsýningina og er hetta 4.387 fleiri enn í 2018 svarandi til eina øking uppá 38%. Í 2019 var býtið millum føroyingar og útlendingar 44% og 56% og er hetta áleið sama býtið sum í 2018.**

### FERÐAFRAMSÝNING

Serframsýningin "Smátt men stórt" vitjaði í Vestmanna, Klaksvík, Fuglafirði, Skálavík, Sørvági og á Tvøroyri umframt at verða sýnd fram í Havn. Talan var um eina myndaframsýning av smákyktum, sum hóast lítlu støddina, kunnu fáa nógv at føla andstygd. Endamálið við framsýningini var at geva fólki møguleika at síggja djórini á ein øðrvísi hátt. Framsýningarnar vórðu væl vitjaðar – í alt 1.654 vitjaðu ferðaframsýningarnar.

### SERFRAMSÝNINGAR

Tvær aðrar serframýningar vóru í 2019. Onnur var um Merkið, sum læt upp 12. apríl, og hin var ein ólavsøkuframsýning. Báðar vóru í framsýningini í Brekkutúni. Ólavsøkuframsýningin var í døgunum 27.-30. juli og 668 fólk vitjaðu framsýningina.

### SAVNSFAGNAÐURIN

Aftur í ár vitjaðu enn fleiri savnsfagnaðin hjá Tjóðsavninum. Savnsfagnaðurin liggur á hvørjum ári í heystfrítíðini, og í ár var evnið 'samskifti'. Heili 2.259 fólk vitjaðu savnsfagnaðin í 2019, og var hetta gott 40% meir enn í 2018, tá talið eisini var sera høgt.

## Vitjandi á Savnsfagnaðinum hjá Tjóðsavninum




### HOYVÍKSGARÐUR

Hoyvíksgarður hevur opið 4 mánaðir í summarhálvuni. Heili 709 fólk fleiri vitjaðu Hoyvíksgarð í 2019 enn árið frammanundan, svarandi til eina øking upp á 31%.

### HVALASTØÐIN VIÐ ÁIR

Á sumri 2019 var fyri fyrstu ferð møguligt hjá fólki at vitja og fáa eina rundvísing á hvalastøðini við Áir. Opið var 10 fríggjadagar og í alt vitjaðu 715 fólk hvalastøðina í 2019 – nógv tann størsti parturin var føroyingar.

### KOLTUR

Í Koltri vitjaðu 432 gestir í savnshúsinum heima í Húsi summarhálvuna í 2019 í mun til 362 vitjandi árið frammanundan. Eisini her er ein munandi øking í vitjanartølunum. Í skrásetingini verður ikki gjørt upp, um tað eru føroyingar ella útlendingar.

## Vitjandi – Hoyvíksgarður






# STARVSFÓLK, SUM ERU GIVIN ELLA BYRJAÐ Í 2019

Jógvan Fróði Garðshorn Hansen hevur í nógv ár arbeitt sum parttíðarsettur lívfrøðihjálpari á stovninum og samstundis arbeitt á Biofar í Kaldbak. Tann 1. februar 2019 fór hann í farloyvi frá savninum og segði seg síðani úr starvinum í farloyvistíðarskeiðinum.

Tann 1. februar 2019 varð Magnus Gaard settur sum savnsvørður á Plantudeildini. Hann hevur leingi undirvíst á Miðnámsskúlanum í Vestmanna, og tá skúlin søkti eftir stjóra, tók Magnus ta avbjóðingina á seg og segði seg úr starvinum á Tjóðsavninum við ársenda.

Ann Sølvia S. Purkhús varð sett sum fornfrøðingur tann 1. juni 2019. Ann Sølvia varð liðug sum cand.mag. í fornfrøði 2013 við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn. Ann Sølvia hevur fornfrøðiligar royndir úr Føroyum og uttanlands, har hon m.a. hevur arbeitt í Danmark, Grønlandi, Ukraina og Jordan.

*Starvsfólk 2019:*


Herleif Hammer
Stjóri


Kim J. Clementsen
Húsavørður


Hákun Andreasen
Savnsteknikari


Jóannes Stephansson
Savnsteknikari


Súsanna Joensen
Konservator


Tórarinn N. á Rípuni
Savnslærari


Elsuba Olsen
Bókhald


Rannvá Dahl
Skrivstovufólk


Helgi D. Michelsen
Savnvørður, fornfrøðisdeild


Janus Hansen
Savnvørður, landdjóradeild


Tórálvur Weihe
Savnsarkitektur, bygningsdeild


Jón Aldará
Lívfrøðingur


Sanna Hansen
Fíggjarfulltrúi


Bjarni Mikkelsen
Lívfrøðingur. Hvalagranskingin


Herdis H. Jacobsen
Savnshjálpari


Ólavur H. Øster
Savnsteknikari


Bjørn Patursson
Fyristøðumaður, Koltur


Magnus Gaard
Savnsvørður, plantudeild


Josefina Dam Haraldsen
Journal


Erland Viberg Joensen
Savnvørður, fólkalívsdeild


Høgni Arnbjarnarson
Lívfrøðihjálpari


Palli Askham
Savnslærari/KT-vørður


Rannvá Winkler
Savnsvørður


Jógvan Fróði Hansen
Savnsteknikari


Jan Sørensen
Savnvørður, sjódjóradeild


Símun V. Arge
Ráðgevi og granskari


Ann Sølvia S. Purkhús
Fornfrøðingur



*Starvsfólk við Boðanesgjónna frammanfyri grundina har Ludda-Christian hevði lýsismeltarí*

## Vit ganga

**Í februar byrjaði eitt starvsfólka-tiltak við heitinum "Vit ganga".**

Hetta er eitt tiltak, har starvsfólk hvønn mikumorgun ganga ein stuttan túr í nærumhvørvinum. Hugsanin aftanfyri tiltakið er fyribrigdið "walk and talk" ella "spáka og práta". Meðan gingið verður, hava starvsfólk høvi at "sparra" og práta saman óformliga tvørturum fakmørk. Umframt sjálvsøgdu fyrimunirnar við at fáa fríska luft og røra seg eitt sindur, eru túrarnir sera hugnaligir og styrkja samanhaldið á stovninum.



*Starvsfólk á Tjóðsavninum á brúnni í Hoydølum*

# SUMMARY IN ENGLISH

**The whaling station at Áir** opened its doors to visitors in the summer of 2019 even though the restoration and conservation of the whaling station had not yet been completed. The whaling station at Áir is an industrial heritage and a cultural heritage. It is the last remaining whaling station of the 7 original whaling stations in the Faroe Islands.

**The whaling station** was open to visitors every Friday during the summer season offering a guided tour around the premises which turned out to be quite the success.

**Tjóðsavnið has in recent years** focused on technologically developing the work of archaeology in order to be able to execute research more systematically, less expensive, and less time consuming with the help of technological tools such as drones and georadars. Tjóðsavnið had two archaeological excavations in 2019, one of which was in the connection to the destruction of an old house in Tórshavn which had been identified as having archaeological artifacts dating back to as early as year 1700. The other excavation was an ongoing excavation project á Bakka in Velbastað, Streymoy, which continued in 2019 with the excavation of the church building 'niðri á Bakka' in Velbastað. This year's excavation revealed a beautifully laid stone floor and walls. Artifacts found at the site such as pieces of bowls made of soapstone and Faroese clay indicate that it dates back to as early as the Viking Age or the Middle Ages.

**A reconnaissance** was made of the so-called bank guards in Kirkjubø and elsewhere around the islands. Imperative, however temporary, repairs were done to the areas and the process of preparing more permanent solutions to these areas have begun. Tjóðsavnið needs an appropriation towards a project to catalogue relics along the coastline in order to determine what environmental threat these relics are subjected to and what can be done to protect them. With the aim of setting priorities for the most immediate relics to protect, this project is focused on minimizing the archeological loss.

**A total of 1616 birds** were ringed in 2019 in the Faroe Islands, most of which were the European storm petrel. Some of the ringings were quite curious; one of the most curious ones was a graylag goose which had been ringed in the Orkney Islands back in 2010.

**Tjóðsavnið had three special** exhibitions in 2019. One of these was held in connection to the 100 years' celebration of our national flag – Merkið. This exhibition focused on showing and telling fairly unknown and different stories about Merkið. It focused on how people and country have used the flag and its colours in its 100-year-old history. Around the time of St. Olav's Wake Tjóðsavnið had its second special exhibition; this one focused on modern versions of the national Faroese costume. It revealed an extraordinary variety in the national costume both today and historically. The last special exhibition was a photo exhibition of insects that had been magnified. This way visitors had the rare opportunity to see them in all their gloriously beautiful detail. This exhibition was a travelling exhibition that visited around the islands.

**Last year** representatives for Tjóðsavnið attended international conferences and meetings in both Denmark, Iceland, Finland, USA, Canada, Greenland, and Italy.

**2019 turned out** to be another year of many visitors at the exhibitions of Tjóðsavnið. A total of 16.036 visitors visited the exhibitions in 2019 as compared to 11.649 visitors in 2018. 44% of the visitors were Faroese, and 55% were tourists.

Vatnmyllan í Kúrdali





Blá svartaklukka

Svanamerktur prentlutur 541 705

**tjodsavnid.fo**

**FRAMSÝNING**
Brekkutún 6
Hoyvík

**FYRISITING**
Kúrdalsvegur 15
Hoyvík
+298 340 500
tjodsavnid@savn.fo